# MASKINMEISTARIN

Nr. 17 / Juli 2022



# Herjólfur III er eitt gott skip



## Formaðurin fer frá

Bráðtíðindi



SSL-stjórin um Herjólf III:

## Bara fá skip lúka krøvini



## Ingolf fekk álvarsligan skaða av sinnopsgassi

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
Vanliga eru fýra útgávur um árið.

**Blaðnevnd**
Ólavur Gunnarsson, ábyrgd
Tummas Eli Høj Joensen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda Maskinmeistaran, kunnu boða frá hesum í telduposti til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,– kr. um árið;

**Endurgeving**
Endurgeving bert loyvd samsvarandi lógini um upphavsrætt. MASKINMEISTARIN kann takast niður sum pdf á heimasíðuni hjá felagnum, www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
Herjólfur III: Ingolf S. Olsen
Ólavur Gunnarsson: Ingolf S. Olsen
Jóhan Petur Abrahamsen: Pavla Eliasen
Ingolf Johannesen: Grækaris Djurhuus Magnussen

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting**
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
502022

**Prent og liðugtgerð**
Føroyaprent
info@foroyaprent.fo
314555

Upplag: 800

# INNIHALD

Oddagrein......3
Ólavur leggur frá sær......4
Herjólfur III er eitt gott skip......9
Bara fá skip lúka krøvini......12
Málið er ein varandi loysn......14
Estonia broytti teytirnar......16
Ólavur og Rógvi í nevndina......18
Frambrot og vandasjógvur á sáttmálaøkjunum......22
Fekk álvarsligan skaða av sinnopsgassi......26
Átta maskinmeistarar fingu prógv......34
Góð semja við FAG......37
Sáttmálaleinging smakkaði illa......39
Lønarhækkan gagnar báðum pørtum......40
Tíðindi......42
Føðingardagar......43

# Vit vilja gera almennu størvini lokkandi – men vilja arbeiðsgevararnir?

Tað hevur leingi verið alment kent, hvussu trupult tað er at fáa arbeiðsmegi til umsorganarfakini. Orsøkin er í fyrsta lagi tað lága lønarlagið á hesum økjunum.

Vit síggja nú nakað tað sama í maskinmeistarafakinum.

Fleiri arbeiðsgevarar, serliga í tí almenna geiranum, sum hava lýst eftir maskinmeistarum seinastu tíðina, hava ikki fingið so mikið sum eina tí einastu umsókn til størvini, og bert fáir maskinmeistarar hava tímað so frægt sum at seta fyrispurningar um størvini.

Eisini síggja vit, at almennir stovnar, har vælkvalifiserað arbeiðsmegi vanliga hevur trivist væl, nú hava trupult við at halda uppá maskinmeistararnar, tí teir leita sær onnur og betri lønt størv.

Tað kemur javnan fyri, at ørkymlaðir leiðslupersónar hjá tí almenna seta seg í samband við okkum á skrivstovuni í Maskinmeistarafelagnum fyri at spyrja, hvat teir skulu gera.

Eftir mínari fatan er trupulleikin einfaldur, tað er tann gitni, fastlæsti lønarkarmurin hjá tí almenna. Hann er ein spennitroyggja, ið ikki tekur atlit til útboð og eftirspurning, og nú verður hann so dyggiliga yvirhálaður av tí skjótt hækkandi kostnaðarstøðinum í landinum. Tá er meira lokkandi at finna sær starv í privatu vinnuni, har stóri eftirspurningurin eftir væl útbúnari og dugnaligari arbeiðsmegi kann síggjast aftur á lønarseðlinum.

Jú, trupulleikin er einfaldur at staðfesta, men um hann er eins einfaldur at loysa, tað er upp til almennu arbeiðsgevararnar. Í Maskinmeistarafelagnum vilja vit fegin gera størvini hjá tí almenna lokkandi og framtíðartryggja tey – tað er júst tað, vit berjast fyri, í hvørjum einastu lønarsamráðingum.



Men spurningurin er, um almenna arbeiðsgevarasíðan eisini vil tað.

Undir samráðingum tey seinastu árini hava vit áhaldandi víst á trupulleikan, og hava inniliga heitt á mótpartin um saman við okkum at fara konstruktivt til verka at royna at framtíðartryggja hesi sera týdningarmiklu størvini. Men tað hevur verið ógvuliga trupult fyri ikki at siga ómøguligt at fáa nakað forstáilsi fyri tí. Almenna arbeiðsgevarasíðan hevur bara latið oyruni aftur fyri larmandi alarmklokkunum og tvíhildið um karmin. Men nú er av álvara farið at sansa at hjá teimum, tí teir fáa ikki fólk.

Samráðingar um teir almennu sáttmálarnar, bæði teir hjá landinum og teir kommunalu, standa fyri framman, og tað skal vera mín vón, at boðskapurin hesa ferð verður tikin í álvara av mótpartinum. Høvuðsmálið hjá báðum pørtum má vera at lyfta hesi almennu størvini upp á eitt støði, har tey aftur megna at lokka væl útbúnað arbeiðsmegi til sín og varðveita hana.

Og at røkka tí málinum krevst í fyrsta lagi, at lønarlagið verður lyft, so tað munar.

Almennu sáttmálarnir ganga út 1. oktober, og sum tit kunnu lesa aðrastaðni í blaðnum, fari eg frá sum formaður 1. september. Tí komi eg ikki at standa á odda fyri samráðingunum, men eg verði til taks og skal royna mítt ítasta at vera góður í ráðum.

Hetta verður eisini seinasta oddagreinin frá mínari hond í Maskinmeistaranum, og vil eg her at enda nýta høvi at takka øllum tykkum limum fyri hollan stuðul, trúfesti og tol hesi árini, eg havi havt ta æru at sitið sum formaður í felagnum. Maður kemur í mans stað, og eg eri vísur í, at nevndin fer at skipa seg við einum góðum, nýggjum formanni.



***Ólavur Gunnarsson***
*– formaður í Maskinmeistarafelagnum*

Bráðtíðindi

# Ólavur leggur frá sær

**Ólavur Gunnarsson fer í starv sum innkeypsleiðari hjá Mest, og sigur tí formanssessin í Maskinmeistarafelagnum frá sær. Hann sigur, at hann ongantíð hevur hildið, at formansstarvið eigur at vera eitt lívsstarv, og nú, tá hann fekk eitt so gott starvstilboð, var rætta løtan hjá sær at fara úr formanssessinum**



*- Tað ber altíð til at kjakast um, nær rætta løtan at gevast er, men eg haldi, at fyri meg er hon nú, sigur Ólavur Gunnarsson, sum 1. september fer frá sum formaður í Maskinmeistarafelagnum og tekur við sum innkeypsleiðari hjá skipasmiðjuni Mest*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

Ingolf S. Olsen - PRESS

1. september fer Ólavur Gunnarsson frá sum formaður í Maskinmeistarafelagnum eftir at hava sitið í sessinum í hálvt fimta ár.

Orsøkin er, at hann tá byrjar í nýggjum starvi sum innkeypsleiðari hjá skipasmiðjuni Mest.

Ólavur Gunnarsson varð uttan mótvalevni valdur til formann í Maskinmeistarafelagnum á aðalfundinum 24. mars 2018, tá undanmaður hansara Páll Hansen ikki stillaði uppaftur.

Tað er fulltíðarstarv at vera formaður í Maskinmeistarafelagnum, og hann verður valdur fyri trý ár í senn. Ólavur Gunnarsson var upp á val aftur á aðalfundinum 13. mars í fjør, hann tók við afturvali, og ongin stillaði upp ímóti honum.

**Nýggj avbjóðing**

Nú hevur formaðurin so gjørt av at siga sessin frá sær í ótíð fyri at royna nýggjar leiðir.

– Mest er eitt stórt, nýmótans arbeiðspláss við nógvum og sera fjølbroyttum arbeiðsuppgávum. So tá eg fekk boðið starvið sum innkeypsleiðari har, helt eg tað vera eina ov spennandi avbjóðing at lata fara aftur við borðinum. Sjálvandi hevur tað kravt drúgva og gjølliga umhugsan. Eg eri fakfelagsmaður, og at



*Framhald á síðu 6*


HIDDENFJORD
RAISED IN THE WILD
Fyrsti alari í heiminum at gevast við flogflutningi
At flúgva vøru elvir til óneyðugt $CO_2$-útlát.
Ov nógv $CO_2$-útlát elvir til veðurlagsbroytingar.
Við at skifta til sjóflutning er $CO_2$-útlátið fyri flutning til USA minkað við heili
94%



*Enn hevur nevndin í Maskinmeistarafelagnum ikki tikið endaliga støðu til formansspurningin, men spurningurin bleiv umrøddur á nevndarfundinum fríggjadagin 24. juni, tá báðir tiltakslimirnir í nevndini eisini vóru við. Úr vinstru eru tað Ólavur Gunnarsson, formaður, Róald Johannesen, annar tiltakslimur, Regin M. Olsen, næstformaður, Tummas Eli Høj Joensen, nevndarlimur, Ólavur J. Østerø, nenvdarlimur, Poul Heri Selfoss, fyrsti tiltakslimur, og Rógvi K. Hansen, nevndarlimur*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

verða valdur formaður í sínum fakfelag er eitt stórt álit, sum eg havi ógvuliga stóra virðing fyri.

– Hinvegin havi eg ongantíð hildið, at formansstarvið eigur at vera eitt lívstíðarstarv. Tað ber altíð til at kjakast um, nær rætta løtan at gevast er, men eg haldi, at fyri meg er hon nú. Eg eri 58, so tað sigur seg sjálvt, at tað fer neyvan at verða títtari ímillum tilboðini um slík størv sum hetta hjá Mest frameftir.

– Tað hevur eisini gjørt avgerðina léttari at vita, at felagið hevur eina stak góða nevnd og er í góðum hondum. Ongin skal heldur vera í iva um, at mær hevur dámt felagsarbeiðið stak væl, og samstarvið í nevndini hevur verið framúr, sigur Ólavur Gunnarsson.

## Onnur mugu døma

Ætlanirnar og hugskotini vóru nógv, tá hann tók við sum formaður, men hálvt fimta ár – ella hálvt annað formansskeið – er ikki long tíð at fremja umfatandi broytingar í einum fakfelag. Fráfarandi formaðurin heldur tó ikki, at nøkur stórmál liggja í hálvum gekki, nú hann mynstrar av á formansskrivstovuni í Maskinmeistarafelagnum.

- Tað vilja altíð vera onkur meira og minni átrokandi mál at loysa, tá ein mynstrar av, og soleiðis verður tað eisini, nú eg fari; sáttmálasamráðingarnar, sum liggja fyri framman, eru eitt dømi, men soleiðis eru spælireglurnar nú einaferð.

– Eg hevði sjálvandi eisini mál og visjónir, tá eg bjóðaði meg fram sum formansevni, annars skuldi eg hildið meg burtur. Nú bleiv tað til hálvt fimta ár; okkurt náddi eg, og sumt náddi eg ikki. Eg fari ikki við ringum samvitskubiti út ígjøgnum dyrnar í Maskinmeistarafelagnum, men hvussu eg havi hilnast sum formaður, tað fari eg at lata limirnar og onnur døma um – eg kann tó siga, at eg havi roynt tað frægasta, eg megni, sigur Ólavur Gunnarsson.

## Innanhýsis loysn

Enn er ikki púra greitt, hvør tekur yvir formanssessin í Maskinmeistarafelagnum 1. september. Eftir aðalfund skal nevndin, sum saman við formanninum telur fimm fólk, sambært lógum felagsins skipa seg við einum næstformanni. Seinastu nógvu árini hevur Regin M. Olsen verið næstformaður.

Viðtøkurnar siga tó onki um, hvussu farast skal fram, tá formaðurin fer frá í ótíð. Eftir at hava fingið løgfrøðisliga ráðgeving er nevndin tó komin eftir, at hon annaðhvørt kann skipa seg av nýggjum, so at ein av verandi nevndarlimum verður formaður, tað ið eftir er av formansskeiðnum hjá Ólavi Gunnarsson, ella tað verður lýst til eykaaðalfund at velja nýggjan formann.

– Vit vænta, at nevndin fer at finna eina innanhýsis loysn, sigur Ólavur Gunnarsson.

## Til taks í heyst

Sum greitt frá aðrastaðni her í blaðnum hevur Maskinmeistarafelagið júst gjørt nýggjan sáttmála fyri maskinmeistararnar í privatu vinnuni á landi, men samráðingar eru aftur á breddanum í heyst. Tá eru tað almennu sáttmálarnir við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Fráfarandi formaðurin sleppur tó, sum áður nevnt, ikki bara endanum í tí sambandinum, tí sambært viðtøkunum skal hann vera til taks at ráðgeva nýggja formanninum í tríggjar mánaðir.

Poul Heri Selfoss er fyrsti tiltakslimur í nevndini hjá Maskinmeistarafelagnum, og hann fær fast sæti í nevndini, tá Ólavur Gunnarsson fer frá.










ROYN TÍNA VITAN Í VERULEIKA-KENDUM UMSTØÐUM

# TAK SKEIÐINI
# TÁ TÚ ERT HEIMA

## Vit hava nýggjastu tøknina og bestu umstøðurnar at læra nýtt.

Siglir tú úti ella heima er tað ómakaleyst at taka skeiðið hjá okkum. Vinnuháskúlin hevur í 130 ár útbúgvið tey bestu av teimum bestu.

## VIT BJÓÐA ØLL SKEIÐ

- BRM-skeið
- ECDIS-skeið
- GOC-skeið
- DP-skeið
- Eldsløkkingar-skeið
- SSO-skeið
- ERM-skeið
- Tecdis-skeið
- Heilsu-skeið
- ARPA-skeið
- Trygdar-skeið
- Stroppa-skeið

... og nógv onnur skeið

Finn skeiðsyvirlit og tilmelding á
**www.skeid.vh.fo**

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

SENDISTOVAN




*Herjólfur III á Skála, har hann er til 30 ára klassing hjá Mest. Tá dokkingin har er liðug fer hann at flyta farm um Suðuroyarfjørð, til hann skal loysa Smyril av frá hálvum august og fimm-seks vikur fram. Síðan fer hann aftur í fyrsta lagi at sigla farm um Suðuroyarfjørð, men kann, um brúk verður fyri tí, eisini sigla við ferðafólki*





# Herjólfur III er eitt gott skip

**Íslendska ferðamannaskipið Herjólfur III kemur afturat Smyrli á suðuroyarleiðini, men skal einsamalt røkja siglingina, tá Smyril frá hálvum august fer í dokk í fimm-seks vikur. Vit vitjaðu umborð saman við formanninum í Maskinmeistarafelagnum, tekniska inspektørinum hjá Strandfaraskipum Landsins og teimum báðum tænastuleiðarunum á Smyrli. Og tey lótu øll væl at**

Tekstur og myndir:
Ingolf S. Olsen – PRESS

Tað kyndi av álvara undir kjakið um ferðasambandið hjá suðuroyingum, tá tað í vár frættist, at 30 ára gamla íslendska ferðamannaskipið Herjólfur III einsamalt skal røkja suðuroyarleiðina hjá Strandfaraskipum Landsins, SSL, tá Smyril skal í dokk í fimm-seks vikur.

Tí Herjólfur III er nógv minni enn Smyril, og tí hildu nógv, at hann eisini hevur samsvarandi minni kapasitet, bæði tá tað ræður um ferðafólk og farm. Men samanborið við Galaxy og Prince, sum loystu Smyril av, tá hann var í dokk í ávikavist 2017 og 2019 er tað bara kapasiteturin at flyta bilar og harvið eisini farm, sum er minni hjá Herjólfi III, meðan hann í veruleikanum kann hava fleiri ferðafólk umborð enn bæði Prince og Galaxy.

Og verður bara hugt at skipinum sjálvum, og hvørjum standi, tað er í, so er als onki at finnast at við Herjólfi III. Tvørturímóti.

Tað vóru teir báðir Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, og Ólavur Hallur Johannesen, tekniskur inspektørur hjá SSL, samdir um, tá teir her fyri saman vóru umborð og gingu skipið ígjøgnum, eftir at tað var komið á Skála. Har skal tað til 30 ára klassing hjá Mest, umframt at onkrar ábøtur og broytingar skulu gerast, eitt nú við rampuni, áðrenn skipið kann setast í sigling á suðuroyarleiðini.

**Sjódygdin alt at siga**
Herjólfur III hevur áður røkt rutusiglingina ímillum Heimaey í Vestmannaoyggjunum og íslendska meginlandið, og varð bygt til ta siglingina í 1991-1992.

– Gaman í er skipið lítið samanborið við Smyril, og tað er 30 ára gamalt. Men tað er í stak góðum standi, og tað sæst allastaðni, at tað eisini er stak væl røkt, segði Ólavur Hallur Johannesen.

Hann vísti eisini á, at tá tað um suðuroyarleiðina ræður, nyttar lítið bara at hyggja at støddini á skipinum. Sjódygdin hevur alt at siga, og fyri at sleppa at sigla við ferðafólki um Suðuroyarfjørð í at kalla øllum veðri, skal skipið vera klassað til umstøðurnar, sum har eru, eitt nú tá tað um alduhædd ræður.



*- Tað eru bara heilt fá skip, ið lúka klassakrøvini til ferðafólkaflutning um Suðuroyarfjørð. Tað eru tað næstan bara cruise-linarar, ið gera – umframt Smyril. Men eisini Herjólfur III lýkur tær ásetingarnar, greiddi Ólavur Hallur Johannesen, tekniskur inspektørur hjá Strandfaraskipum Landsins, frá*

– Tað eru helst nógv skip og eisini størri skip enn hetta til leigu á heimsmarknaðinum, um tað skal vera, men tað eru bara heilt fá skip, ið lúka klassakrøvini til ferðafólkaflutning um Suðuroyarfjørð. Tað eru tað næstan bara cruise-linarar, ið gera – umframt Smyril. Men eisini Herjólfur III lýkur tær ásetingarnar, greiddi Ólavur Hallur Johannesen frá.

## Bygt til hesa havleið

Tá Smyril var í dokk fyri trimum árum síðan, leigaði SSL grikska ferðamannaskipið Prince at seta inn í staðin. Tað skipið var líka stórt sum Smyril, men Ólavur Hallur Johannesen vísir á, at klassin avmarkaði Prince so nógv, at skipið í veruleikanum kundi flyta væl færri ferðafólk, enn Herjólfur III kann.

– Eg vænti, at Herjólfur III fer at roynast væl. Skipið er bygt til sigling í Norðuratlantshavi, og tað hevur alla nýmótans tøkni at mótvirka rulli, eitt nú stabilisatorvengur, og liggur vindurin tráður inn á síðuna, so kann skipið pumpast upp, so tað kortini liggur beint, segði tekniski inspektørurin hjá SSL.

## Positivt bilsnar

Av bryggjuni sær Herjólfur III við fyrsta eygnabrái eitt sindur slitin út, tí tað er nakað síðan, at skipið varð málað seinast. Men tær báðar Finngerð Bech og Anna Eysturberg, ið eru tænastuleiðarar á hvør sínari vakt á Smyrli, gjørdust positivt bilsnar, tá tær komu umborð. Tí alt sá út til at vera í góðum standi, hóast tað treyðugt so sást onkunstaðni, at skipið er 30 ára gamalt.

Tær gáaðu sjálvsagt mest um, hvussu umstøðurnar fyri tænastuveitingini umborð vóru, og gleddust millum annað um stóru galluna, sum er væl útgjørd og hevur góðar arbeiðsumstøður. Øll kømrini eru eisini rein og nosslig, og tað sama kann sigast um uppihaldsøkini.

## Væl hildið skip

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum heldur eisini, at Herjólfur III er eitt gott skip.

– Um støddin er nøktandi ella ikki, tað fari eg at lata onnur kjakast um, men skipinum sjálvum er onki galið við. Maskinrúm og alt tað tekniska er í góðum standi og væl hildið, so í so máta verður hetta eitt gott arbeiðspláss hjá maskinmeistarunum, segði Ólavur Gunnarsson.

Maskinmeistarafelagið er í tingingum við SSL og Fíggjarmálaráðið um, hvussu størvini hjá maskinmanningini á Herjólfi III skulu flokkast.

– Har eru ikki allir smálutir komnir upp á pláss enn, men eg vænti ongar stórvegis trupulleikar í tí sambandinum, segði Ólavur Gunnarsson.

SSL hevur fyribils leigað Herjólf III til út á heystið næsta ár at bøta um ferðasambandið, serliga farmaflutningin, til og úr Suðuroy. Tá dokkingin á Skála er av, fer Herjólfur III tískil at røkja suðuroyarsiglingina saman við Smyrli, til hann skal í dokk fimm-seks vikur um hálvan august. Tað tíðarskeiðið verður Herjólfur III einsamallur á suðuroyarleiðini, men aftaná fara bæði skipini aftur at røkja siglingina. Tó er avtala gjørd við íslendska eigaran, Vegagerðin, um, at skipið skal aftur til Íslands sum avloysaraskip í nakrar vikur í oktober í ár.



*Herjólfur III hevur tveir Alpha-MAN-motorar, og teir eru, eins og alt annað umborð, stak væl hildnir*



*Anna Eysturberg og Finngerð Bech, tænastuleiðarar á Smyrli, práta við tekniska inspektørin hjá Strandfaraskipum Landsins og formannin í Maskinmeistarafelagnum um skipið. Tær báðar vóru positivt bilsnar av góða standinum umborð*




*Herjólfur III er væl minni enn Smyril. Hann er eisini væl minni enn bæði Galaxy og Prince, sum loystu av í sambandi við dokkingarnar í 2017 og 2019, og tekur færri bilar enn tey. Men hinvegin kann hann hava væl fleiri ferðafólk við enn tey bæði skipini, tí hann er bygdur og góðkendur til sigling á harðbalnu sjóleiðunum í Norðuratlantshavi*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Bara fá skip lúka krøvini

**Herjólfur III kann hava fleiri ferðafólk enn bæði Prince og Galaxy, men væl færri bilar. Virkandi stjórin á SSL heldur, at nógvar av atfinningunum raka skeivt, og leggur dent á, at dokkingin av Smyrli bara er í fimm-seks vikur, og aftaná tað verður Herjólfur III afturat Smyrli og ikki í staðin fyri hann**

Ingolf S. Olsen - PRESS

Herjólfur III hevur fingið nógv oman yvir seg, áðrenn hann hevur siglt ein tann einasta túr ímillum Krambatanga á Trongisvágsfirði og Havnina. Ikki minst hava suðuroyarpolitikarar í bæði Løgtingi og bý- og bygdaráðum funnist at loysnini, sum Strandferðslan hesa ferð hevur funnið fram til, nú Smyril seint í summar skal í dokk í fimm-seks vikur.

Men Jóhan Petur Abrahamsen, virkandi stjóri á Strandferðsluni, heldur, at tey, ið bara finnast at, gloyma allar batarnir og fyrimunirnar, sum verða bæði áðrenn og aftaná dokkingina. Tí gaman í skal 30 ára gamla íslendska bilfergan einsamøll klára suðuroyarleiðina í nakrar vikur, men áðrenn tað og aftaná verður hon afturat Smyrli og ikki í staðin fyri hann.

– Eg vænti, at fólk og vinna í Suðuroynni fara at síggja øðrvísið upp á Herjólf III, tá bæði hann og Smyril vera í sigling, og eg vænti heldur ikki, at hann fer at roynast so illa sum avloysaraskip, sum summi spáa, sigur Jóhan Petur Abrahamsen.

## Minkandi kapasitetur

Hann vísir á stóru trupulleikarnir, sum eru, tá tað ræður um at finna avloysaraskip, ið lúka hørðu krøvini, ið verða sett til sigling við ferðafólki á baldrutum sjóleiðum sum tí um Suðuroyarfjørð.

– Tað er ikki ein einføld uppgáva, og tað er ein uppgáva, sum bara gerst truplari við tíðini. Eitt er sjálvandi, at krøvini til ferðafólkaflutning blivu nógv herd, serliga í Norðuratlantshavi, eftir syndarligu vanlukkuna, tá Estonia sakk í 1994. Afturat tí kemur so herda kappingin, tí so hvørt sum støðugt fleiri økonomar verða settir at stýra í reiðaríunum kring allan heim, vaksa krøvini um svørt tøl á botnlinjuni. Tað merkir millum annað, at tøki kapasiteturin minkar, tí tað er ongin, sum hevur skip sløðandi, bara tí Strandferðslan ætlar sær í dokk av og á.

– Jú, vit kundu saktans funnið bæði nógv størri og nógv nýggjari skip, um tað bara skuldi siglt við ferðafólki og ikki eisini við bilum. Tí tað eru rættiliga

nógv skip av tí slagnum, sum kunnu leigast. Men tá eru vit aftur í sama stað, at vit ikki fáa bilarnar og farmin ímillum. Okkara hagtøl vísa, at okkurt um tveir triðingar av ferðafólkunum á suðuroyarleiðini hava bil við, tá Smyril siglir, og tí er tað helst eisini júst tað, ið serliga ørkymlar suðuroyingar í øllum hesum, sigur Jóhan Petur Abrahamsen.

## Færri bilar

Tað er eisini bilflutningurin, ið væntast at verða trongasti fløskuhálsurin á suðuroyarleiðini, meðan Smyril er í dokk, tí Herjólfur III tekur nógv færri bilar enn Smyril.

Smyril tekur umleið 200 bilar, men Herjólfur III tekur bara ein triðing av hesum – hann tekur 67 bilar, og plássið kann býtst upp ímillum størri og minni akfør. Lægri bilakapasiteturin avspeglar sjálvsagt eisini ein lægri farmakapasitet, tí at kalla allur farmaflutningurin er við flutningsbilum og í bingjum.

Hinvegin hevur Herjólfur III loyvi at flyta fleiri ferðafólk um Suðuroyarfjørð á hvørjum túri, enn bæði Galaxy og Prince høvdu, tá teir loystu Smyril av í sambandi við dokking í ávikavist 2017 og 2019.

Tey bæði skipini vóru nógv størri enn Herjólfur III og tóku eins nógvar bilar og Smyril. Men av tí, at tey vóru klassað til sigling á nógv minni harðbalnum sjóleiðum enn teimum í Norðuratlantshavi, vóru tey nógv avmarkað í ferðafókatali. Galaxy hevði loyvi at hava 400 ferðafólk við og Prince 365. Smyril kann sigla við umleið 800 ferðafólkum um veturin og umleið 1.000 um summarið.

## Rúmar ferðafólkið

Herjólfur III kann tó hava 530 ferðafólk við, bara líkindini eru góð – tað er, tá skiparin metir tí sonevndu signifikantu alduhæddina at vera í mesta lagi 2,5 metrar. Er metta signifikanta alduhæddin oman fyri tað, skal ferðafólkatalið avmarkast til 460.

– Hetta merkir, at tað verða ógvuliga fáir túrar, um nakar, at ferðafólk noyðast at standa eftir, og tað haldi eg, fólk gloymir. Um vit hyggja at hagtølunum og taka koronutíðina burtur úr, so vísir tað seg, at í hasum tíðarskeiðnum, sum Herjólfur III einsamallur skal avloysa Smyril, eru tað bara fýra til seks dagar, at ferðafólkatalið fer upp um 400, og tað eru bara tveir dagar, at tað fer upp um 500. Tað er, tá Smyril siglir, men royndirnar siga okkum harafturat, at ferðafólkatalið fer munandi niður, tá avloysaraskip eru inni, tí ferðafólk, ið generelt ikki dámar at sigla, kenna seg helst uppaftur ótryggari við fremmand skip og setast tí aftur, greiðir Jóhan Petur Abrahamsen frá.

- Prince loysti av undir tí seinastu dokkingini, sum var somu tíð á árinum sum henda, ið nú verður. Eg veit bara um ein túr, har ferðafólk stóð eftir, og tað var tann allarfyrsti hjá Prince. Og hann tók altso færri ferðafólk enn Herjólfur III, sigur hann.

Prince sang annars seinasta ørindi í sínum svanasongi, tá hann loysti Smyril av fyri trimum árum síðan, tí síðan er grikska ferðamannaskipið upphøgt.

## Standur og komfortur í lagi

Jóhan Petur Abrahamsen heldur ikki, at nakað er at finnast at, tá tað ræður um standin og komfortin umborð á Herjólfi III.

– Skipið er lítið samanborið við Smyril og eitt nú Prince. Tað er tað, ið eyguni síggja, tá tú hyggur at tí úr landi, men fert tú umborð, so sært tú, at tað í hvussu er er eitt ógvuliga stórt lítið skip, tí plássið er so væl útnyttað. Til dømis eru kahúttir við tveimum koyggjum og brúsu til ferðafólk at leiga ígjøgnum alla longdina á skipinum í báðum borðum.

## Alt skal til Havnar

Tað, sum dregur mest niður við Herjólfi III, er lítli farmakapasiteturin, tá hann er einsamallur á suðuroyarleiðini. Men virkandi stjórin á Strandferðsluni hevur áður heitt á flutningsvinnuna, um eisini sjálv at vera við til at loysa trupulleikarnar við farmaflutninginum, meðan Smyril er í dokk.



*– Eg vænti, at fólk og vinna í Suðuroynni fara at síggja øðrvísið upp á Herjólf III, tá bæði hann og Smyril vera í sigling, og eg vænti heldur ikki, at hann fer at roynast so illa sum avloysaraskip, sum summi spáa, sigur Jóhan Petur Abrahamsen, virkandi stjóri á Strandferðsluni*

*Mynd: Pavla Eliasen*

– Tað er eitt sindur farligt av mær at siga so, men eg meini, at flutningsfeløgini eisini eiga at kenna ábyrgd fyri, at serligar støður kunnu íkoma í sambandi við ta tænastu, teir bjóða. Vit hava veitingarskyldu, og henni renna vit ikki undan – tí hava vit eisini spent okkum út at fáa útvegað eitt egnað skip.

– Vit hava tó ongan møguleika at finna eina loysn, sumt til fulnar dekkar flutningskapasitetin hjá Smyrli, men soleiðis sum henda vinnan er skipað í Føroyum í dag, so eru vit bara eitt lið í flutningsketuni. Vit detta so partvíst út úr hesi ketuni í fimm-seks vikur, og tað kann henda allastaðni í ketuni. Har haldi eg, at tey, sum bjóða flutningstænastu, eisini sjálv mugu hava onkra back-up skipan, sigur Jóhan Petur Abrahamsen.

Við hesum sipar hann í fyrsta lagi til, at tey stóru farmaskipini kundu lagt at í Suðuroy, tí ein sera stórur partur av farmaflutninginum hjá SSL um Suðuroyarfjørð er fiskur og alifiskur til útflutnings. Fiskurin verður fluttur til Havnar, har hann síðan verður umskipaður til farmaskipini.

# Málið er ein varandi loysn

**Kjakið snýr seg bara um, hvussu Herjólfur III fer at roynast sum avloysaraskip fyri Smyril, men málið hjá SSL er at finna eina varandi loysn fyri í fyrsta lagi nøktandi farmaflutningi um Suðuroyarfjørð. Ætlanir um møguliga at keypa Herjólf III verða tó av ongum, tí íslendsku eigararnir hava broytt ætlan**

Ingolf S. Olsen - PRESS




*– Alt fokus er nú á, hvussu gott ella ringt skip Herjólfur III er at loysa Smyril av, og vit fáa nógv oman yvir okkum, men yvirskipað hevur málið alla tíðina verið at finna eina varandi loysn á serliga farmaflutninginum um Suðuroyarfjørð, sigur Jóhan Petur Abrahamsen, rakstrarleiðari og virkandi stjóri hjá Strandfaraskipum Landsins*

*Mynd: Pavla Eliasen*

Tóku Strandferðslan, SSL, og politiski myndugleikin kjansin beinanvegin, hann stóð teimum í boði, hevði Herjólfur III ikki bara verið leigaður inn at hjálpa til á suðuroyarleiðini, men verið partur av flotanum hjá SSL.

Herjólfur III er bygdur í 1991-1992 til sigling ímillum Vestmannaoyggjar og íslendska meginlandið, og Íslendska Vegagerðin, ið røkir almennu strandfarasiglingina í Íslandi, hevði skipið til sølu, tí ein nýggjur Herjólfur er bygdur og settur inn í ta siglingina.

SSL hevði kunnað ognað sær skipið fyri okkurt um 30 milliónir krónur, men har vildu tey tó fyrst tryggja sær, at skipið yvirhøvur var egnað til endamálið. Tí varð strongt á at sleppa at leiga Herjólf III fyrst, so hann kundi roynast á suðuroyarleiðini. Íslendingar høvdu tó hug at selja skipið beinanvegin og vildu treyðugt ganga við til at leiga tað út.

Teir vildu selja skipið til Føroya og samstundis gera eina avtalu um, at teir kundu leiga tað av og á, tá teir høvdu brúk fyri avloysaraskipi.

### Alt vent á høvdið

Eitt nýtt vegasamband á íslendska Norðurlandinum vendi tó alt á høvdið, greiðir Jóhan Petur Abrahamsen, virkandi stjóri á SSL, frá. Tí á Vegagerðini funnu tey út av – eins og SSL hevur gjørt tað – at tað samanumtikið er so trupult at finna egnað skip sum avloysaraskip ella til tíðaravmarkaða sigling, at teir nú heldur vildu eiga eitt sjálv. Og tað skuldi vera Herjólfur III.

– Tey eru í holtur við at gera veg til eitt øki á Norðurlandinum, har ein gomul ferga í dag er einasta ferðasambandið. Fólk í økinum hava tó víst á, at har ofta ikki verður koyrandi um veturin, og tí krevja tey, at eitt skip eisini verður tøkt tá at røkja sambandið. Tí hevur Vegagerðin nú snarað 180 gradir og vil nú bara leiga okkum skipið, men ikki selja tað, sigur Jóhan Petur Abrahamsen.

Talan er um leiðina á Breiðafirði, har ferjan Baldur røkir siglingina, og Vegagerðin væntar ikki, at tað fer at bera til at fáa Baldur góðkendan av klassanum eftir september í 2023. Sostatt er ætlanin fyribils, at Herjólfur III skal røkja ta leiðina, til ein onnur varandi loysn er funnin. Ætlanir eru um dagføra vegasambandið, sum í dag er at kalla óbrúkiligt um veturin, tí har legst so nógvur kavi, og tá kavin tiðnar, er ofta omanlop.

Baldur siglir millum Brjánslæk og Stykkishólm, og leggur at í Flatey á vegnum. Umframt at røkja hesa siglingina er ætlanin, at Herjólfur III framvegis eisini verður til taks at loysa nýggja Herjólf av í siglingini upp á Vestmannaoyggjarnar í sambandi við dokkingar.




***Herjólfur III skal serliga taka sær av farmasigling um Suðuroyarfjørð, tá hann ikki beinleiðis loysir Smyril av. Men skipið verður væntandi skrásett við ikki færri enn fýra manningarskjølum, so tað annaðhvørt bara kann sigla við farmi, ella tað eisini kann sigla við ferðafólki, har tað so verða tríggjar graderingar uppeftir. Talan verður tá í høvuðsheitum um at kobla nakrar bjargingarbátar inn ella út***

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

Akkurát nær íslendingar fáa brúk fyri Herjólfi III á leiðini millum Brjánslæk og Stykkishólm, veit Jóhan Petur Abrahamsen ikki, men tað er so í hesum umfarinum eydnast SSL at leiga Herjólf III til Føroya til í oktober næsta ár. Tó við tí treyt, at íslendingar fáa skipið aftur í einar fýra vikur í heyst at røkja siglingina ímillum Vestmannaoyggjar og íslendska meginlandið, tí nýggi Herjólfur skal í dokk tá.

– Teir eru í júst somu støðu sum vit, at teir onki avloysaraskip hava, og tað er ógvuliga torført at finna nakað á marknaðinum, sum er hóskað til sigling á okkara sjóleiðum, sigur Jóhan Petur Abrahamsen.

## Varandi loysn

Herjólfur III skal loysa Smyril av, tá hann um hálvan august og fimm-seks vikur fram skal í dokk í Danmark, men bæði áðrenn og aftaná tað skal hann vera í fastari sigling afturat Smyrli, til leigumálið gongur út næsta heyst.

– Nú er møguleikin at keypa skipið ikki longur til staðar, men hetta skal so geva okkum nakrar royndir. Alt fokus er nú á, hvussu gott ella ringt skip Herjólfur III er at loysa Smyril av, og vit fáa nógv oman yvir okkum, men yvirskipað hevur málið alla tíðina verið at finna eina varandi loysn á serliga farmaflutninginum um Suðuroyarfjørð. Tá bæði skipini fara at sigla, verður ein eyka farmatúrur sigldur hvønn dag fýra dagar um vikuna. So kunnu vit eftir eina tíð eftirmeta tørvin, men væntandi verða hesir farmatúrarnir eitt framstig, sigur Jóhan Petur Abrahamsen á.

Tó at ætlanin í fyrsta lagi er, at Herjólfur III skal lætta um farmaflutningin, so skal hann eisni við stuttum skotbrái kunna taka sær av ferðafólkaflutningi.

- Vanliga siglingin verður farmasigling uttan ferðafólk, men eg vænti, at skipið fer at verða skrásett við fýra ymiskum manningarskjølum, so at tað antin bara kann sigla við farmi, ella tað kann sigla við einum ávísum ferðafólkatali, har tað so verða tríggjar graderingar uppeftir. Tað verður upp á saman máta, sum vit gera við Ternuni nú, og sum eisini er galdandi fyri onnur skip, har tað stórt sæð bara snýr seg um at kobla nakrar bjargingarbátar inn ella út, men alt skipið verður hildið uppi á fullum standardi alla tíðina, greiðir virkandi stjórin á Strandferðsluni frá.

## Gera sær royndir

Hvussu leikur fer á heysti á 2023, tá Herjólfur III skal latast íslendingum aftur, veit hann ikki.

– Nú skulu vit gera okkum hesar royndirnar, men tað hendir ógvuliga nógv á føroyska samferðsluøkinum og við ætlanum um menning av bæði vegakervi og føstum sambondum, so fortreytirnar kunnu saktans verða heilt nógv broyttar eftir hálvum øðrum ári, sigur Jóhan Petur Abrahamsen.

Í sáttmálanum fyri SSL ímillum Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið eru maskinmeistararnir á strandfaraskipunum flokkaðir í tríggjar bólkar alt eftir skipastødd – bólkur I umfatar Smyril, bólkur II Teistan, Ternuna og Hasfjord og bólkur III tey smærru skipini Sam, Rituna, Sildberan og Spógvan.

Tá Herjólfur III loysir Smyril av frá hálvum august til umleið 1. oktober, kemur tann írestandi manningin av Smyrli. Men tá skipið er í farmasigling, skal tað hava sína egnu manning, og skal hon innplaserast í galdandi sáttmála. Tær tingingarnar eru í gongd nú.

Jóhan Petur Abrahamsen sigur seg vænta, at bólkingin helst verður ein millumloysn lík henni, sum var funnin, tá Erla Kongsdóttir legðist afturat flotanum hjá SSL.



*Herjólfur III lýkur øll trygdar- og stabilitetskrøv til sigling á okkara leiðum. Skipið kann í øllum vanligum veðri hava upp í 460 ferðafólk umborð og í góðum veðri 532 – í hesum tølunum er manningin tald við*

# Estonia broytti teytirnar

**Eftir at ferðamannaskipið Estonia koppaði og sakk í 1994, tí bildekkið fyltist við sjógvi, eru krøvini til ro-ro ferðamannaskip sera nógv herd. Londini á okkara leiðum hava enn strangari krøv, enn SOLAS-standardurin ásetir, eitt nú tá tað ræður um góðkenning og avmarkingar í sambandi við ymiskar signifikantar alduhæddir**

Ingolf S. Olsen - PRESS

Ógvusliga herd krøv til sjódygd er ein meginorsøk til, at tað er so torført at finna skip at loysa eitt nú føroysku strandfaraskipini av, tá tey til dømis skulu í dokk.

Og beinleiðis orsøkin til herdu krøvini er syndarliga vanlukkan við ferðamannaskipinum Estoniu. Skipið koppaði og sakk í Eystursjónum út fyri finsku strondini, tá tað í vánaligum líkindum var á veg til Stokkhólm í Svøríki úr Tallinn í Estlandi um náttina 28. september í 1994. Ferðafólkini og manningin taldi tilsamans 989 fólk, og av teimum lótu 852 fólk lív í vanlukkuni.

Tey trý londini Svøríki, Estland og Finnland settu eina felags skaðanevnd at kanna orsøkina til vanlukkuliga skipbrotið, og skaðanevndin kom við síni frágreiðing í 1997. Niðurstøðan í henni var, at orsøkin til vanlukkuna var, at bógportrið á Estoniu hevði fingið skaða í vánaliga veðrinum og varð skrætt av av einum broti. Síðan fyltist bildekkið við sjógvi, so skipið misti stabilitetin, koppaði og sakk.

**Ivi um orsøkina**

Sjálvt um bógportrið próvfast var dottið av skipinum, er ivi tó seinni sáddur um frágreiðingina hjá skaða-

nevndini, tí videoupptøkur av vrakinum av Estoniu á havbotninum vísa, at stór hol eisini eru á skrokkinum. Holini blivu avdúkað á heysti 2020 í sambandi við upptøkur til eina sjónvarps-dokumentarsending og elvdu til kjak um veruligu orsøkina til, at Estonia fórst. Tó hildu serfrøðingar tá, at holini vóru so mikið lítil, at tey neyvan vóru orsøk til vanlukkuna. Fleiri serfrøðingar hildu hinvegin, at holini helst vóru komin á skipið, tá tað sakk og rakti steinar á havbotninum.

Spildurnýggjar upptøkur av Estonia-vrakinum hava broytt ta fatanina, tí tær vísa, at holini eru nógv størri enn upprunaliga hildið – tað størsta varð á heysti 2020 mett at vera umleið 22 metrar langt, men nú vísa upptøkurnar, at tað er næstan tvær ferðir so langt – 40 metrar – og seks metrar breitt.

Sjógvur streymar skjótt inn ígjøgnum eitt so stórt hol, og tað kann bæði hava ávirkað stabilitetin á skipinum og gjørt, at skipið høgdi ímóti brotunum við nógv størri megi, enn tað var smíðað til at klára. Bógportrið kann so hava skrætt seg leyst av hesi orsøk og gjørt ilt verri.

Hetta er alt óvist enn, men sama hvat neyva orsøkin var til sorgarleikin í Eystrasalti í september 1994, og hvussu hendingagongdin hevur verið, so var úrslitið, at bildekkið á Estoniu fyltist við sjógv, og skipið misti stabilitetin og fórst.

Beinanvegin slíkar vanlukkur henda, kemur trygdin og tey altjóða krøv, sum eru viðvíkjandi trygd á sjónum, í brennidepilin. Tað hendi eisini, tá Titanic fórst við New Foundland 15. apríl í 1912 eftir at hava rent á eitt ísfjall, og tá bilfergan Herald of Free Enterprise koppaði beint uttan fyri havnina í Zeebrugge í Belgia 6. mars í 1987. Bara fyr at nevna tvær kendar vanlukkur við ferðamannaskipum í okkara parti av heiminum í fríðartíð, sum hava kostað nógv mannalív. Eitt opið bógportur var eisini orsøkin til vanlukkuna við Herald of Free Enterprise, tá 193 fólk doyðu.

## Trygdin í brennidepilin

Hjá IMO (International Maritime Organization), bleiv sjóneykan eftir Estoniu-vanlukkuna serliga sett á evnini hjá ro-ro-skipum at halda seg flótandi og á rættkjøli, eftir at hava fingið skaða, sum loyvir sjógvi inn á bildekkið.

IMO umsitur altjóða sáttmálan um trygd á sjónum, SOLAS (Safety of Life at Sea), og eftir vanlukkuna við Estoniu blivu generellu SOLAS-ásetingarnar um stabilitet og evnini hjá skipum at sleppa væl frá skaðum, har vatn kemur á dekkið, munandi herdar. Í 1996 herdu nøkur lond – Danmark, Finnland, Írland, Noreg, Stórabretland, Svøríki og Týskland – sínar reglur uppaftur meira við sonevndu Stokkhólm-semjuni.

Føroyska lóggávan um trygd á sjónum og Skipaeftirlitið var tá danskt málsøki, so nýggju ásetingarnar vóru eisini galdandi fyri Føroyar, og fylgdu eisini við, tá málsøkið seinni bleiv yvirtikið frá dønum.

## Strong stabilitetskrøv

Ein at týdningarmestu ásetingunum er tann, ið verður nevnd “Vatn á dekk”, og sum snýr seg um evnini hjá einum skipi at hóra undan, tá illa vil til, og sjógvur sleppur inn á bildekkið.

– Allar stabilitetsútrokningar máttu gerast av nýggjum á øllum skipum, eftir at Stokkhólm-semjan var gjørd. Um vit til dømis taka Ternuna, so klárar hon í dag minni enn ein triðing av tí, hon var góðkend til, tá hon sigldi um Leirvíksfjørð. Og Teistin klárar á leið helvtina av tí, hann hevði klárað áðrenn Stokkhólm-semjuna, greiðir Jóhan Petur Abrahamsen, virkandi stjóri á SSL, frá.

Tað, sum serliga avmarkar skipini, er stabiliteturin, tá skipið fær skaða.

– Fyri leikfólk er tað eitt sindur torskilt, men tað snýr seg í stuttum um, hvussu skjótt sjógvur sleppur inn á dekkið, tá ein skaði hendir, til dømis á bógportrið, og hvussu væl skipið er brynjað til slíkar støður, greiðir Jóhan Petur Abrahamsen frá.

## Alduhæddin avgerandi

Eitt týðandi mát í góðkenningini av skipunum er tann sonevnda signifikanta alduhæddin. Tann signifikanta alduhæddin í einum sjóøki er miðalhæddin á aldunum í tí triðinginum av aldunum, har tær eru størstar, máldar í eitt ávíst tíðarskeið.

Og tað er her, at Herjólfur III blívur so kappingarførur samanborið við flest onnur skip á marknaðinum, umframt at hann lýkur øll tey vanligu klassakrøvini til ferðamannaskip á okkara sjóleiðum. Hann er góðkendur at sigla við 530 ferðafólkum, um tann signifikanta alduhæddin er 2,5 metur, og fer hon upp um tað, kann hann sigla við 460 fólkum.

– Tað merkir, at skipið kann sigla við 460 fólkum í øllum veðri, sum vit vanliga sigla í, og við 530 fólkum tað mesta av tíðini um summarið. Fyrr varð munur gjørdur á í góðkenningini, um talan var um summarsigling ella vetrarsigling, men tað er broytt, so tað er latið upp til skiparan at meta um alduhæddina – og um tann signifikanta alduhæddin er oman fyri ella niðan fyri 2,5 metrar, sigur Jóhan Petur Abrahamsen.

Bildekkið á Herjólfi III kann skottast av við einum hydrauliskum skotti, og tað ger, at hann eisini er góðkendur at sigla við meira farmi – ella stórum flutningsbilum – enn hann annars hevði verið. Kapasiteturin, tá hann bara flytir farm og ikki hevur persónbilar á dekkinum, er einar 17 bingjur tilsamans, býttar á 40 og 30 fóts bingjur.

# Ólavur og Rógvi í nevndina

**John Højsted stillaði ikki uppaftur, og Jóhan Mørkøre fall, tá nevndarval var á skrá á aðalfundinum. Nýggir í nevndini eru Ólavur J. Østerø og Rógvi K. Hansen. Poul Heri Selfoss varð fyrstvaldur sum tiltakslimur, og tí tekur hann sæti í nevndini, tá formaðurin fer frá 1. september**

Tekstur og myndir:
Ingolf S. Olsen - PRESS

Maskinmeistarafelagið helt sín aðalfund á Parnassinum á Hotel Hafnia í Havn 19. mars, og uppmøtingin var góð, nú tað aftur bar til at halda ein vanligan aðalfund, sum ikki varð skerdur av koronu. Tað fegnaðist formaðurin, Ólavur Gunnarsson, eisini stórliga um, tá hann beyð vælkomin.

Landið lat aftur á grækarismessu í 2020 vegna koronufarsóttina, og tí bleiv aðalfundurin tað árið ikki hildin fyrr enn seint í mai. Tann í fjør var í mars, sum vanligt, men bæði hann og tann í 2020 máttu avmarkast til bara at umfata tað mest neyðturviliga, sum viðtøkurnar krevja av einum aðalfundi.



*Eftir at hava sitið í nevndini í Maskinmeistarafelagnum í 12 ár, stillaði John Højsted, sum hevur fylt 67 ár, ikki uppaftur. Á aðalfundinum takkaði hann nevndini og felagnum fyri 12 góð ár*

Eftir formansfrágreiðingina og roknskaparframløguna var nevndarval á skrá, og har hevði spenningur longu valdað í fleiri mánaðir undan aðalfundinum.

### Kapping um nevndarsessir

John Højsted og Jóhan Mørkøre vóru upp á val hesa ferð, og John Højsted hevði í góðari tíð boðað frá, at hann ikki stillaði upp aftur, nú pensjónsaldurin hjá honum var rokkin. Jóhan Mørkøre hevði hinvegin boðað frá, at hann vildi taka við afturvali, og tá freistin at stilla upp áðrenn aðalfundin var úti 15. desember í fjør, høvdu eisini Ólavur J. Østerø og Rógvi K. Hansen boðað frá uppstilling. Til ber eisini at stilla upp á sjálvum aðalfundinum, men ongin afturat bjóðaði seg fram.

Sostatt vóru trý valevni til tveir nevndarsessir, og úrslitið bleiv, at teir báðir Ólavur J. Østerø og Rógvi K. Hansen blivu valdir. Ólavur J. Østerø vann sín sess trygt við 47 atkvøðum, men munurin ímillum Rógva K. Hansen, sum var til skips og tískil ikki til staðar á aðalfundinum, og Jóhan Mørkøre var meira tepur. Rógvi K. Hansen fekk 32 atkvøður – fimm meira enn Jóhan Mørkøre.

Spenningur var eisini um valið av teimum báðum tiltakslimunum, sum skulu veljast hvørt ár. Eisini her bjóðaðu trý valevni seg fram: Poul Heri Selfoss, Róald Johannesen og Pól Jákup Larsen. Poul Heri Selfoss og Róald Johannesen høvdu sessirnar frammanundan, og teir vórðu báðir afturvaldir. Poul Heri Selfoss varð fyrstvaldur við 31 atkvøðum – tvær fleiri enn Róald Johannesen – og hann fer tí at taka sæti í nevndini, tá Ólavur Gunnarsson leggur frá sær 1. september, sum tað er greitt frá aðrastaðni í blaðnum.

### Hugni og samvera

Aðalfundirnir í 2020 og 2021 vórðu sum nevnt sera avmarkaðir orsakað av koronu-undantaksstøðuni og turrgeldir, tá tað ræður um hugna og sosiala samveru.

Men tað bleiv væl og virðilga lønt aftur á aðalfundinum í ár, tá ríkiligt rúm eisini var sett av til tann sosiala partin, sum hoyrir einum góðum aðalfundi til. Tá tann formligi aðalfundin var liðugur bleiv borðreitt við góðum døgurða, og prátið gekk lystiliga. Afturvið var syrgt fyri góðum undirhaldi, har trubadururin Sámal Ravnsfjall spældi og sang sínar kendu og væl dámdu sangir, og stand-up komikarin Elisa Vang syrgdi fyri látrinum við sínum skemti.



*Framhald á síðu 20*



*Uppmøtingin var góð á aðalfundinum í ár, eftir at teir tveir undanfarnu aðalfundirnir vóru nógv avmarkaðir og turrgeldir fyri hugna og sosiala samveru orsakað av koronu*



*Sjúrður Heinesen, skrivstovuleiðari, savnar atkvøðuseðlar inn á spennandi nevndarvalinum. Trý valevni vóru til tveir nevndarsessir, og somuleiðis vóru tríggir um boðið at gerast tiltakslimir*



*Eyðbjørn Larsen, advokatur, er vorðin fastur fúsur sum fundarstjóri á aðalfundunum hjá Maskinmeistarafelagnum*



*Ólavur Gunnarsson heldur sína formansrøðu, og skrivarin og gamla nevndin lýða á. Úr vinstru eru tað Sjúrður Heinesen, skrivstovuleiðari, og nevndarlimirnir Jóhan Mørkøre, John Højsted, Tummas Eli Høj Joensen og Regin M. Olsen*



*Jóan Petur Patursson, sum í nógv ár sat í nevndini í Maskinmeistarafelagnum, hjápti eisini til við at savna atkvøðuseðlarnar inn*



*Ólavur J. Østerø tók av møguleikanum at halda eina stutta valrøðu. Hon mundi muna, tí hann fekk flest atkvøður á nevndarvalinum*



*So varð nevndin mannað. Úr vinstru er tað nývaldi Ólavur J. Østerø, nevndarlimur, Regin M. Olsen, næstformaður, Ólavur Gunnarsson, formaður, Tummas Eli Høj Joensen, nevndarlimur, Róald Johannesen, annar tiltakslimur, og Poul Heri Selfoss, fyrsti tiltakslimur. Hin nývaldi nevndarlimurin, Rógvi K. Hansen, vantar á myndini, tí hann var til skips og tískil ikki til staðar á aðalfundinum. Eftir aðalfundin hevur nevndin skipað seg soleiðis, at Regin M. Olsen heldur fram sum næstformaður*



*Jóhan Mørkøre hevur sitið í nevndini síðan 2018, men nú hann á nevndarvalinum hesa ferð ætlaði at taka eitt triðja skeið, gjørdist hann akkurát ov stuttur. Tað tók hann við rættum ryggi, takkaði fyri tíðina og ynskti teimum nývaldu og restini av nevndini hepna hond*



*Rógvi K. Hansen vann sær sæti í nevndini í Maskinmeistarafelagnum á aðalfundinum í mars, men var ikki sjálvur til staðar, tí hann var til skips. Her er hann avmyndaður á fundi í felagshúsunum hjá Maskinmeistarafelagnum*



# Lívstrygging

Flestu okkara eru sera umhugsin tá hús, bilar og aðrar ognir skulu tryggjast. Men mong gloyma at tryggja seg sjálvan.

**Lat okkum hjálpa tær at seta saman títt fíggjarliga trygdarnet.**

liv.fo



*Ólavur Gunnarsson kom víða um í síni formansrøðu. Hann óttaðist eitt nú hugin hjá politisku skipanini at pilka við samfelagsligar grundfunksjónir, til dømis Strandferðsluna, sum í dag er ein landsstovnur, men sum røddir í samgonguni hava talað fyri í staðin at gera til eitt alment partafelag, og interkommunala SEV, sum kreftir í samgonguni hava sagt seg vilja privatisera*

# Frambrot og vandasjógvur á sáttmálaøkjunum

**Ólavur Gunnarsson lýsti í formansfrágreiðingini gongdina á teimum ymisku sáttmálaøkjunum og kundi siga frá bæði góðum og minni góðum tíðindum og útlitum. Lønarlyft, ið muna, verða í brennideplinum í samráðingunum, sum eru fyri framman**

Tekstur og myndir:
Ingolf S. Olsen - PRESS

Sum altíð kom formaðurin víða um í síni formansfrágreiðing. Øll frágreiðingin liggur á heimasíðuni hjá Maskinmeistarafelagnum, mf.fo, men her verður drigið saman um tann partin av frágreiðingini, ið snúði seg um sáttmálarnar og sáttmálaøkini.

**Fiskiskipini harðast rakt**

Ólavur Gunnarsson greiddi frá, at millum limirnar í Maskinmeistarafelagnum vóru tað serliga teir umborð á fiskiskipunum, sum høvdu merkt peningaligan svia av koronufarsóttini.

– Vit hava undir stórum parti av farsóttini havt fiskaprísir, sum hava ligið langt undir teimum prísum, sum vóru áðrenn koronu. Hetta hevur verið galdandi bæði fyri botnfiskin og uppsjóvarfiskin. Prísurin kom uppaftur út ímót ársenda í fjør, men tað gjørdi fiskiskapurin eftir botnfiski ikki, staðfesti hann.

Síðan tók hann saman um gongdina á teimum ymisku sáttmálaøkjunum.

## SEV og SSL í vandasjógvi

Í sáttmálunum við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, KAF, vóru á tí jaligu síðuni fleiri nýggjar flokkingar av størvum gjørdar, men á minus-síðuni nevndi formaðurin eisini viðurskifti, sum hann sá vandar í.

- Her hugsi eg um vaksandi ágang at broyta ymiskar týdningarmiklar samfelagsligar grundfunksjónir, sum vit eru so bundin av í okkara lítla oyggjasamfelag. Seinasta dømið hevur verið, at fyrrverandi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vildi gera Strandfaraskip Landsins til eitt alment partafelag. Eg eri eitt sindur stúrin fyri hesum, eitt nú um hvar starvsfólkini enda í einari slíkari tilgongd, og eisini hvørji árin ein slík umlegging fer at hava á veitingarskylduna og kostnaðarstøðið. Tí almennu partafeløgini hava eins og tey privatu sínar greiðu partafelagsreglur at halda seg til, segði Ólavur Gunnarsson.

Og á tí kommunala sáttmálaøkinum var tað politiska órógvin rundan um SEV, sum ørkymlaði hann, tí hann sær stórar samfelagsligar vandar í at privatisera elframleiðsluna og -veitingina, sum hann helt vera "ta kanska týdningarmestu grundfunksjónina í landinum".

## Handilsskipaflotin veksur

Sáttmálin við Reiðarafelagið fyri Handilsskip gongur ikki út fyrr enn næsta ár, men formaðurin greiddi frá, at semja var fingin í lag fyri føroysku maskinmeistararnir, sum í 2020 blivu uppsagdir hjá norska reiðarínum Simon Møkster, tá reiðaríið strikaði Merkið og flaggaði aftur til Noregs.

– Í kjalarvørrinum av hesum reistu manningarnar krøv ímóti reiðarínum vegna mista hýru í hesi gongdini. Eftir drúgva viðgerð samdust partarnir um at gera semju, sum hevði við sær, at menninir fingu alt tað, sum kravt var, greiddi Ólavur Gunnarsson frá.

Í formansrøðuni fegnaðist hann annars um, at føroyski handilsskipaflotin er øktur seinasta árið. Serliga er tað reiðaríið Navigare við heimstaði í Søldarfirði, sum stendur fyri vøkstrinum við tað, at reiðaríið fekk trý nýggj skip í sín flota í fjør og tvey fyrra hálvár í ár.

*Framhald á síðu 24*




*Formaðurin vísti eisini á frambrot og góða gongd á fleiri økjum. Hann fegnaðist millum annað um vaksandi handilsflotan, sum serliga reiðaríið Navigare hevur æruna av, og um semjuna, sum tryggjaði mistu hýruna hjá føroysku manningunum, ið blivu uppsagdar, tá norska reiðaríið Simon Møkster flaggaði aftur til Noregs*

– Hetta má sigast at verða sera gleðiligt, ikki minst fyri okkum sum fakfelag havandi í huga, at tað eru limir hjá okkum, sum mannað maskinrúmini. Eisini eru onnur skip á veg, eitt nú hevur Bakkafrost útvegað sær eitt útgerðarskip til virksemið í Skottlandi, umframt at teir eru í holt við at byggja eitt nýtt og størri far í Turkalandi, segði formaðurin.

**Fakfeløg by-passað**

Formaðurin fegnaðist um Jákup Sverra, nýggja havrannsóknarskipið, um nýggju aktørarnar í uppsjóvarfiskiskapinum og allar teir nýbygningarnar, sum annaðhvørt eru kontraktaðir ella í umbúna í uppsjóvarflotanum og barentshavsflotanum.

Men hann var sera ivasamur um aðrar partar av teimum siglandi arbeiðsplássunum. Millum annað tað, at manningartrot í ávísum skipabólkum hevur fingið reiðarar at leita sær út um landoddarnar eftir manning, og politiska skipanin hevur hjálpt til við at snikka saman sonevndar “fast track-skipanir” at stytta um bíðitíðina.

– Vit síggja eisini, at tað spretta strámenn at standa fyri hesum, men sum ikki einaferð, so eru fakfeløgini fullkomiliga “by-passað” í hesari tilgongdini. Í fjør bleiv ein kunngerð lýst, sum greinar, hvørji viðurskifti ein arbeiðsgevari skal kunna starvsfólk um, áðrenn tað verur sett í starv.

– Men vit hava snøgt sagt ikki ánilsi av, hvat tað er fyri arbeiðsmegi, sum kemur til landið, hvussu skipanirnar við millummonnum eru skrúvaðar saman, og eg ivist stórliga í, um hesir útlendingarnir vera kunnaðir um teirra viðurskifti og møguleikar, vísandi til nevndu kunngerð. Vit síggja á lønarútgjaldingunum, at tær eru stílaðar til menninar sjálvar, men um hetta í veruleikanum er so, loyvi eg mær at ivast í.

– Tað er í hvussu so er eingin, sum á nakran hátt hevur tikið okkum við í hesari tilgongdini, og óttist eg stórliga fyri, at tað tískil kunnu vera grundleggjandi starvsviðurskifti, sum í fleiri førum slett ikki vera hildin sambært galdandi reglum, segði Ólavur Gunnarsson.

**Uppiborið lønarlyft**

Síðan aðalfundin hevur Maskinmeistarafelagið longt sáttmálan við Føroya Reiðarafelag fyri fiskiskipaflotan, og samráðingarnar við Føroya Arbeiðsgevarafelag um privat settar maskinmeistarar á landi komu á mál 17. juni – bæði samráðingarnar um fiskiskipini og semjan við Føroya Arbeiðsgevarafelag eru umrøddar í greinum aðrastaðni í blaðnum.

Teir almennu sáttmálarnir ganga tó ikki út fyrr enn 1. oktober, og enn sum áður eru føroysku maskinmeistararnir eftirbátar á tí økinum samanborið við grannalondin, staðfesti Ólavur Gunnarsson í røðu síni á aðalfundinum.

Í tí sambandinum vísti hann á, at nýggj endastig verða sett inn fyri at hækka lønirnar á ymiskum almennum sáttmálaøkjum hjá øðrum fakfeløgum.

– Fyri tað mesta er talan um tey, sum taka sær av teimum sokallaðu bleytu virðunum í samfelagnum. Misskil meg ikki, eg unni teimum sjálvandi hvørja krónu, sum tey fáa stríðst seg til, men vit kunnu ikki bara sita og hyggja at, meðan onnur gera væl størri hál enn vit. Eg haldi avgjørt, at okkara limir eisini hava uppiborið eitt sovorðið lønarlyft, og er tað tí, vit fara eftir í komandi samráðingum, segði hann.

Hesar samráðingarnar eru eisini umrøddar í aðrari grein.

**Trupult í Grønlandi**

Maskinmeistarafelagið hevur verið í einari sera drúgvari tilgongd at fáa endurnýggjað og dagført teir grønlendsku sáttmálarnir, sum felagið hevur við felagið Polar Seafood, ið eigur fleiri rækjuskip, og APK, sum er áhugafelag hjá teimum grønlendsku botnfiskatrolarunum og grønlendska fiski- og veiðimannafelagnum.

Ólavur Gunnarsson greiddi frá, at Maskinmeistarafelagið og Polar Seafood loksins vóru komin ásamt um eitt semjuskjal, ið hann sum heild var nøgdur við, og sum skal vera grundarlagið undir einum nýggjum sáttmála.

Sáttmálin við APK er hinvegin ikki komin undir land enn. Í fjør heyst vóru samráðingar í Keypmannahavn, sum bóru á tann rætta bógvin, men av tí, at sjálvur samráðingarleiðarin hjá APK hevði forfall vegna sjúku, bleiv bert ein leysliga orðað ávegis semja gjørd tá.

Ólavur Gunnarsson greiddi frá, at tað síðan hevur gingið ógvuliga striltið at fáa APK at standa við ávegis semjuna, og at grønlendski mótparturin heldur tyktist royna at fáa teir partarnar av semjuni, sum gagnar honum, við í ein nýggjan sáttmála, og síðan útihýsa restini.

– So væl spælir klaverið ikki, og eg havi gjørt teimum greitt, at her er talan um tveir partar, og um vit skulu hava eina semju, so má alt tað, vit vóru samdir um, takast við. Teir hava síðan boðið aftur til fundar í Keypmannahavn, men vit hava sagt nei takk vísandi til semjuna, vit mettu okkum at hava fingið. Hetta fekk loksins glið á, og hava teir sent upprunaliga semjuskjalið út til limirnar at góðkenna, greiddi hann frá.

Formaðurin duldi ikki, at samráðingarnar um hesar báðar sáttmálarnir tæra upp á orkuna hjá felagnum – og eisini tolið – tí tað tykist verða alsamt truplari at gera semjur fyri tey grønlendsku skipini.

– Vit hava brúkt sera nógvar ressursur, bæði peningaliga og í tíð, at royna at fáa nýggjar avtalur undir land. Um vit gera tað upp, so er talan um upphæddir, sum tað fer at taka rúma tíð at vinna innaftur. Men tað er okkara skylda at røkja teir sáttmálar, vit hava, so væl, sum vit yvirhøvur kunnu, sama hvat kostnaðurin er. Vit halda tó, at vit við hesum avtalum hava framtíðartryggjað sáttmálaviðurskiftini og vóna onkursvegna, at vit hava gjørt, at tað verður munandi lættari at fáa teir endurnýggjaðar í framtíðini, segði Ólavur Gunnarsson.

# EYKALUTIR

www.mest.fo
MEST
SHIPYARD

**24/7 TÆNASTA – RING +298 79 11 00**


Lætt at bíleggja umvegis telefon ella teldupost


24/7 tænasta


Størsta og besta goymsla í landinum



Sølubúð/goymsla í Havn, Runavík og á Skála


Vit koyra kring alt landið


Álítandi tænasta

MEST P/F · J.C. Svabosgøta 31 · P.O. BOX 65 · FO-110 Tórshavn · tel: +298 301100 · sales@mest.fo

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

er nú á Vanganum





*Ingolf Johannesen var maskinmeistari á Heldarstindi, tá teir í 1982 fingu sinnopsgass í trolið*

*Mynd: Grækaris Djurhuus Magnussen*

**NAVN:** Ingolf Johannesen
**FØDDUR:** 3. mai 1950
**FØÐISTAÐUR:** Sandavágur
**BÚSTAÐUR:** Sandavágur
**HJÚNASTØÐA:** Giftur við Eyðbjørg Johannesen
**BØRN:** Fýra synir og eina dóttur
**STARV:** Pensjóneraður maskinmeistari

# Maskinmeistari á Heldarstindi: Fekk álvarsligan skaða av sinnopsgassi

**Tað var kanska ikki so løgið, at Ingolf Johannesen var við Heldarstindi sum maskinmeistari á sinni, tá teir fingu sinnopsbumbu í trolið. Tí áhugin fyri motorum var so stórur, at hann longu sum 12 ára gamal fekk kraddað ein gamlan Gøta-motor frá abba sínum. Hann umvældi motorin og fekk hann í gongd. Her byrjaði leið hansara sum maskinmeistari. Í 1984 var hann ein teirra, ið varð harðast raktur av sinnopsgassi í Eystrasalti**

Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS

Abbi hansara var skipari og reiðari, so haðani kom ein partur av alskinum hjá Ingolfi Johannesen til sjógvin ivaleyst. Pápi hansara var eisini til skips í nøkur ár, millum annað undir krígnum. Hann var eisini við deyðssiglara, og Ingolf minnist pápa sín siga frá, at ein túr á veg heim komu teir í stilli. Tá settu teir bátin út, og teir skiftust at sleipa, og tað var ikki við motori, men við árum, teir róðu, sigur Ingolf Johannesen.

Seinni fekk pápin sær smiðju í Sandavági, og her mundi fræið til maskinmeistarayrkið hjá Ingolfi Johannesen vera sett niður – og seinni blóma. Men vanlukkan við sinnopsbumbuni í trolinum hjá Heldarstindi á sinni hevur merkt alt hansara lív síðan.

**Við Reynsatindi**
Ingolf gekk í barnaskúla í Sandavági, og tá skúlin kom á Giljanesi, fór hann í tann skúlan. Men tá hann kom í 2. real, var hann ómetaliga skúlatroyttur, og so illa tímdi hann, at hann fekk pápa sín at biðja kjans við Reynsatindi. Tá var hann 16 ára gamal.

Dagin fyri, teir skuldu avstað, fór hann til Havnar á Tuberklastøðina, sum vanligt var tá, og har stóðu teir í bíðirøð. Seinni um dagin tóku teir salt, og tá teir løgdu frá bryggju um náttina, var Ingolf tørnaður inn. Tá hann vaknaði, livdi skipið, og hann tørnaði út. Løtu seinni stóð hann afturi í skúrinum, teir høvdu tá siglt gjøgnum Skopunarfjørð, og hann sá beint inn á Vágoynna. Tað rullaði illa, og hann hevði sjóverk.

– Tá hugsaði eg við mær sjálvum, hvat hevur tú gjørt, minnist hann.

Hóast hann hevði sjóverk, var sjóverkurin ikki verri enn so, at hann fór upp til allar máltíðirnar umborð. Hann hevur síðan mangan sagt, at ein góður háttur at sleppa av við sjóverkin, er at eta hann burtur.

Hendan fyrsta túrin hjá Ingolfi Johannesen vóru teir í Vesturgrønlandi, og teir vóru 27 mans. Summarið í Grønlandi er tiltikið gott, og hetta summarið var einki undantak, veðrið var frálíkt at fiska í.

Hesin túrurin við Reynsatindi gjørdist í longra lagi, tí tá Ingolf kom heimaftur, lá eitt bræv frá lærararáðnum til hansara. Hann slapp ikki í skúla aftur tað árið. Tá høvdu teir eisini verið burtur í slakan hálvan fimta mánað.

Hann fór so beint aftur til skips, og tók realprógv skúlaárið eftir. Nú hevði Ingolf Johannesen av røttum fingið smakkin fyri sjólívinum. Lítið visti hann tá um, at hann, saman við skipsfeløgum á Heldarstindi, skuldi koma út fyri eini vanlukku, sum seint verður gloymd.

Hann sigldi nú tvey ár við Reynsatindi, fyrstu túrarnir vóru við snellu, so teir snellaðust summartúrin. Tá kvøldini út á heystið gjørdust myrkari, fóru teir yvir til línu. Hetta var og er fiskiskapur, sum mangur sjómaður argast um, men soleiðis var ikki hjá Ingolfi.

– Eg veit ikki rættiliga hví, men mær dámdi væl línulívið. Tað var strævið í byrjanini, tí tú átti sjeynda hvønn stamp, men sum frá leið lærdi eg at egna skjótari.

**Í smiðjulæru**
Meðan hann var við Reynsatindi,




***Heldarsrtindur við bryggju á Bornholm***

***Privatmynd***

dámdi honum óvanliga væl at vera í maskinrúminum, so eftir at hava siglt í tvey ár, fór Ingolf Johannesen í smiðjulæru hjá pápa sínum. Tá var avgerðin longu tikin um, at hann vildi vera maskinmeistari.

– Áhugin fyri motorum var stórur, tí longu um 12-13 ára aldur fekk eg kraddað ein Gøta-motor frá abba mínum í Suðuroy. Ein annar gamal motorur lá undir einum borði í smiðjuni hjá pápa, og teir vórðu “installeraðir” í hjallin hjá okkum, har sum eitt høsnarhús hevði verið. Vit fingu teir at starta, og so spældu vit skip, greiðir Ingolf Johannesen frá.

Hann hevði sum heild eitt ríkt barnalív í Sandavági. Teir fiskaðu síl í ánni, og teir vóru á seiðabergi. Uppi á Fobbakletti ovarlaga í Sandavági bygdu teir sær smáttu, og har nýttu teir nógva tíð.

– Eg helt eisini í nógv summur til í eini smáttu, sum vit seinnu gjørdu okkum úti í Dysjum, sum vit siga. Vit svóvu har úti og gingu túrar í fjøllini. Síðan heim eftir provianti og út aftur í smáttuna.

## Sinnopsgass negldi likam og sál

Tíðin gongur, og Ingolf Johannesen kemur til mans. Í 1984 tók hann ta avgerðina, at hann skal fara fýra túrar í Eystrasalt at fiska við Heldarstindi. Eitt felag í Sandavági átti tá Heldarstind. Hetta var ein trolbátur, og fiskiskapurin hevði verið góður. Heldarstindur var ein lutfalsliga stórur trolbátur, so tað var ógvuliga strævið umborð – og lítil svøvnur.

Ingolf Johannesen var einsamallur maskineistari, men hann var uppií, tá tað varð hálað og í kryvjingini.

Tað er um morgunin 22. mars 1984. Heldarstindur er til fiskiskap, og teir eru farnir at hála. Trolið varð annars skotið út klokkan seks. Sjey mans eru við hendan túrin.

Undir fiskiskapi í Eystrasalti eru teir vanir at fáa ymiskar lutir inn á dekkið við trolinum, eisini gamlar bumbur, og tað hava teir bara tveitt útaftur.

Meðan teir soleiðis standa og hála, veirarnir rína og hvína í spølunum, havhestarnir uppi yvir skipinum kenna rákan av fiskalivur, og aldurnar bresta móti skipssíðunum, kemur ein stórur lutur, sum minnir um eina bumbu, inn á dekkið. Teir síggja beinanvegin, at hetta líkist ikki tí, teir áður hava fingið inn við trolinum.

Í hesi løtu eru teir staddir 60 fjórðingar vestur úr Lipaya í Russlandi, og klokkan er átta um morgunin. Ingolf Johannesen stendur á dekkinum, tá bellurin kemur inn, og teir síggja beinanvegin, at har er nakað í honum. Tað líktist eini mumbu, og tað vísti seg



*Trolposin er júst komin inn á dekkið á Heldarstindi*

*Privatmynd*

eisini at vera ein bumba, slakar tveir metrar long og 40 sentimetrar í tvørmát. Ingolf Johannesen minnist, at hon var brotnað.

– Har lak nakað úr henni, sum líktist feitti av onkrum slag, og hetta rann niður á dekkið og kom upp á styvlarnar hjá okkum. Bumban varð skorin úr bellinum og tveitt útaftur, men fiskurin varð koyrdur niður í tangan. Gronin á bumbuni og okkurt annað av henni var eisini endað í tanganum, greiðir Ingolf Johannesen frá.

Seinni vísir tað seg, at talan var um eina sinnopsbumbu, og sinnopsgass lak úr brotnu bumbuni. Rættiliga skjótt fyllist alt skipið við sinnopsgassi.

– Tað fyrsta, eg merkti, var, tá eg fór niðurundir at reinsa. Á veg niður gjøgnum leytaran merkti eg ein ómetaliga ringan og stingandi lukt, minti eitt sindur um klor. Og ivaleyst er luktisansurin eitt tað fyrsta, sum rýkur í slíkari støðu, tí tá eg so kom niðurundir, merkti eg ikki hendan ringa luktin meira – heldur ikki meðan vit stóðu og arbeiddu, greiðir hann frá.

Tað var nógv í hesum hálinum, einir sekshundrað kassar, og teir síggja, at nógv av fiskinum, sum kemur niður, hevur hetta løgna feittið á sær.

– Eg minnist, at eg bað onkrar fara upp eftir skiparanum, tí tað bar ikki til at koyra hendan fiskin í lastina, men tað bleiv ikki til nakað. Tá vit høvdu reinsað meginpartin av fiskinum, góvust vit, og koyrdu restina fyri borð. Tá var so nógv av hesum slígginum endað niðri í tanganum, og hann mátti tømast, tí vit skuldu hála aftur. So Jógvan Petersen og eg fóru niður í lastina at taka skittin upp við kurv, greiðir hann frá.

## Støðan versnar

Tá ið tangin er við at vera tómur, byrjar Ingolf Johannesen so smátt at merkja, at alt er ikki, sum tað eigur at vera. Hann kennir eina óvanliga møði, eina yvirmøði. Hann fer so niður á vesið, meðan teir hála veirarnar. Tá hann koyrir buksurnar niður, sær hann, at lørini eru reyð sum tomatir.

– So hyggi eg í spegilin, og síggi, at tað hvíta í eygunum er blóðeytt. Hetta slíggið var eisini komið upp á stivlarnar, og tað royndi eg at vaska av, men tað fekst ikki av.

Meðan hann roynir at vaska stivlarnar, kemur ein av manningini niður og biður hann koma upp at hjálpa teimum, men tá gjørdi hann bart:

– Nei, nú skal háling vera háling, segði eg, og eg fór slett ikki upp á dekkið, sigur hann.

Í staðin fer hann beina leið upp á brúnna til skiparan, Jóhan Petur Kjartanson Hentze, dregur buksurnar niður og vísir honum tomatreyðu lørini, og síðan biður hann skiparan hyggja í eyguni, sum eru blóðreyð.

- Nú mást tú gera nakað við hetta, sigur hann við skiparan.

Støðan er nú soleiðis umborð, at eisini hinir av manningini byrja at kenna seg illa til passar, og eingin ivi er um, at grundin til tað er bumban.

## Sjúkrahúsið og Heimaverjan

Tað fyrsta, skiparin ger, er at ringja á Landssjúkrahúsið, og har fær hann samband við Jógvan Róin, lækna. Jógvan Róin hugsar ógvuliga skjótt, og biður skiparan ringja til donsku Heimaverjuna, og tað ger skiparin. Í Heimaverjuni biðja teir manningina á Heldarstindi bíða eftir boðum. Stutt eftir, nú ringir aftur á brúnni, og tá er tað Heimaverjan.

– Teir biðja okkum fara úr øllum klæðunum og smyrja okkum við eini "antigass"-salvu, og sovorðna salvu høvdu vit umborð. Danska Heimaverjan boðaði okkum eisini frá, at tyrla varð send út til okkara við lækna úr Visby í Gotlandi. Klokkan var fimm seinnapartin, áðrenn tyrlan kom, tað var níggju tímar eftir, at sinnopsbumban kom inn á dekkið, minnist Ingolf.

Manningin fær alsamt størri trupulleikar, áðrenn tyrlan kemur út til teir. Kokkurin hevur gjørt svínahjørtur til døgurða, og fyrsta teir svølgja, leypa teir í hvør sítt heraðshorn at spýggja. Tá er galið við maganum hja teimum øllum.

## Læknin verður loraður niður

Tá klokkan nærkast fimm seinnapartin, hoyrist ljóðið frá tyrluni, og løtu seinni er hon uppi yvir Heldarstindi og manningini. Hon sveimar eina løtu yvir skipinum, meðan læknin verður loraður niður á dekkið. Hann er eitt sindur spurin og ikki sørt ørkymlaður, tí tað einasta, hann hevur fingið at vita, er, at onkur hevur fingið skaða umborð.



*Ingolf Johannesen, vinstrumegin, umborð á Heldarstindi*

*Mynd: Jóhan Elias Simonsen*



*Ingolf Johannesen avmyndaður omanfyri heim teirra í Sandavági*

*Mynd: Grækaris Djurhuus Magnussen*

– Vit hava ivaleyst sæð eitt sindur vanligir út, men vit vísa honum so beinini. Tá ger hann av at taka okkum tríggjar, Zacharias Nielsen, Jógvan Petersen og meg við sær í tyrluna, tí vit vóru ringast brendir – ella etsaðir.

Teir tríggir hava nú so sterkan sviða, at tað kennist sum alt brennir bæði uttan á kroppinum og innvortis. Læknin og onnur byrja at skola og reinsa eyguni longu umborð á tyrluni, sum flýgur teir til Gotlands, har teir verða innlagdir á sjúkrahús.

Teir eru blindir, tá teir koma úr tyrluni, men teir skilja og hoyra, at ein rúgva av myndafólkum stendur og blitsar. Tey hava longu frætt tíðindini um illa staddu sjómenninar úr Føroyum.

Teir verða lagdir í song beinanvegin, teir verða innlagdir, og læknar og sjúkrarøktarfrøðingar byrja at skola og reinsa eyguni. Í fyrstuni biðja tey Ingolf sjálvan halda eyguni opin, men tað er vónleyst. Endin er, at ein

sjúkrarøktarfrøðingur situr við hvørt eygað.

– Tað var so ótespiligt – so óbehagiligt, ja, sum ringastu sveisaraeygu við so nógvari pínu, at eg svímaði beinanvegin, sigur hann.

Hann toldi ikki ljós og fekk tískil ikki hugt. Seinni um kvøldið royndu tey at vakja hann, og tað eydnaðist so dánt, men hann minnist ein sjúkrarøktarfrøðing siga, at nú eru tit allir her.

**Hinir skuldu sigla til Bornholm**

Teir fýra, sum eftir eru umborð á Heldarstindi, eru heldur frægari fyri, enn teir tríggir, sum nú liggja á Sjúkrahúsi í Visby í Gotlandi. Tí verður avgjørt, at teir fýra skulu sigla Heldarstind til Bornholm. Men um midnáttarleitið hendan sama dagin, 22. mars, fáa eisini skiparin, stýrimaðurin og tveir dekkarar eyðkenni ella súmptomir, sum teir tríggir fyrru høvdu fingið. Nakrir teirra vóru tørnaðir inn, og tá teir vakna, nú síggja teir einki. Hálvdan Gudmundsen, stýrimaðurin, er best fyri, tí hann svav, tá hálað varð fyrstu ferð, og sostatt vóru tekini seinkað hjá honum. Teir mugu tískil eisini takast av skipinum við tyrlu og flytast á sjúkrahús í Gotlandi.

Heldarstindur varð sleipaður mannleysur til Rønne á Bornholm.

**Fluttir til Danmarkar**

Manningin á Heldarstindi er ógvuliga illa fyri, meðan teir liggja á Visbysjúkrahúsinum í Gotlandi, og longu tveir dagar seinni, leygarkvøldið 24. mars, verða teir fluttir við einum Herkules-flogfari til Danmarkar.

Tríggir teirra verða innlagdir á Hvidovre Hospital og fýra á Ríkissjúkrahúsið. Zacharias, Jógvan og Ingolf verða innlagdir á Hvidovre, og Jóhan Petur, Hálvdan, John og Anfinn verða innlagdir á Ríkissjúkrahúsið.

Viðgerðirnar eru ikki tær somu á Ríkissjúkrahúsinum sum á Hvidovre. Á Ríkissjúkrahúsinum verður um hetta



*Ingolf Johannesen í sjúkrasongini á Hvidovre Hospitali*

*Privatmynd*



MØRKE MIDT OM DAGEN

*Miðsíðurnar í danskari avís*

mundið givin heilivágur fyri brunasár, meðan tey í Hvidovre nýta vatn og skoling.

Av teimum trimum, sum lógu á Hvidovre, var Ingolf Johannesen ringast fyri, ikki tí hann var ringast brendur, tí hinir báðir á stovuni vóru verri brendir, men hann var væl eldri enn teir, og tað vísti seg, at hendingin var gingin hart út yvir lunguni. Og hann hevði eisini rættiliga nógvan fepur.



*Mikudagin eftir vanlukkuna kom kona Ingolf, Eyðbjørg, til Danmarkar at vitja mannin. Her sita tey úti á gongini á Hvidovre Hospitali*

*Privatmynd*

– Meðan vit sita har og verða skolaðir, kemur ein eygnalækni at taka myndir av eygunum, og eg svímaði, minnist eg. Tá eg reisti meg upp aftur, bað eg um orsakað, so lítið skil var í mær.

Ingolf kendi seg hava ligið leingi á Hvidovre sjúkrahúsi, uttan nakran serligan bata. Hann bað tí inniliga til Gud um at fáa hjálp, og hann visti, at nógv varð biðið fyri sær heima í Føroyum og aðrastaðni. Hetta var seks dagar eftir álopið av sinnopsgassinum.

Stutt eftir inniligu bønina hjá Ingolfi kemur ein pleygari ella sjúkrarøktarfrøðingur inn á sjúkrastovuna og sigur, at nú mugu tey altso finna upp á okkurt, tað ber ikki til, at teir verða liggjandi soleiðis og ongan svøvn fáa av pínuni. Hon fer so út, kemur aftur við einari skúmgummimadrassu, leggur hana inn í brúsukabinuna, og biður Ingolf leggja seg har.

– Saman við skúmgummimadrassuni hevði hon nøkur innballað handkløð, sum hon legði um herðarnar, og tá sovnaði eg... ja, tá sovnaði eg langt um leingi...



*Manningin á Heldarstindi hin 22. mars 1984, tá sinnopsbumban kom í trolið, vóru hesir: Úr vinstru síðu standa Jóhan Petur Kjartanson Hentze, skipari, Sandi, Hálvdan Gudmundsen, stýrimaður, Sandavági, Zacharias Nielsen, dekkari, Sandavági, Jógvan Petersen, dekkari, Sandavági, Ingolf Johannesen, maskinmeistari, Sandavági, John Myllhamar, dekkari, Sandavági og Anfinn Jensen, dekkari, Mykinesi. Myndin er tikin inni í Miðvági í 1993, aftanfyri teir liggur Hambraberg, systurskip hjá Heldarstindi*

*Mynd: Elin H. Gudmundsen.*

**Hoyrdu tað í útvarpinum**
Tíðliga hósmorgunin, meðan kona Ingolf Johannesen, Eyðbjørg, í heimi teirra í Sandavági ger eldra sonin til reiðar at fara í skúla, hoyrir hon útvarpið siga eitthvørt um Heldarstind. Tá standa tey í gongini, átta ára gamli sonurin og mamman.

– Eg hugsaði, at nú hava teir mestur fiskað innanfyri, sigur Eyðbjørg Johannesen.

Klokkan tíggju hendan sama morgunin ringir Birgir, vinmaður Ingolf. Hann skuldi verið við hendan túrin, men av onkrari orsøk hevur hann í staðin útvegað sær ein avloysara. Hann greiðir Eyðbjørg frá, hvat er hent, men hon skilir tað ikki, hon hevur jú ongantíð hoyrt um sovorðið. So tað festir seg ikki heilt, hvussu álvarslig støðan í grundini er. Men sum dagurin líður, skilir hon álvaran í støðuni.

– Vit áttu fýra dreingir, so tað var ikki bara sum at siga tað at leypa avstað, men mikudagin eftir fór eg niður, og eg var niðri í tríggjar vikur, sigur Eyðbjørg Johannesen.

Maðurin, Ingolf, er júst vaknaður eftir at hava sovið á skúmgummimadrassuni inni í brúsukabinuni, tá Eyðbjørg trínur inn um dyrnar á sjúkrastovuni. Í somu løtu letur í Ingolfi, uttan at vita at konan stendur í durunum:

– Dekan fari haldi eg, at eg eri blivin í ordan, soleiðis kennist tað í hvussu er.

Ingolf Johannesen var ikki vorðin frískur, men hann misti stóran part av pínuni hendan dagin, og hon kom ongantíð aftur.

**Merktur fyri lívið**
Júst fýra vikur eftir at teir fingu sinnopsbumbuna í trolið á Heldarstindi, sat hann í flogfarinum á veg heim aftur til Føroya. Útskrivaður av Ríkissjúkrahúsinum.

Maskinmeistarin á Heldarstindi gjørdist kortini ongantíð heilt frískur aftur, men hevur drigist við stórar trupulleikar av sinnopsgassinum. Kortini hevur hann arbeitt mong ár sum maskinmeistari síðani tá, bæði á sjógvi og landi – altíð við vitanini um, at hann brádliga kann gerast sjúkur. Serliga lunguni hava tikið skaða, og afturvendfandi lungnabruni hevur verið ein stórur trupulleiki.

Men Ingolf Johannesen hevur barnatrúnna at falla afturá. Foreldrini vóru kirkju- og heimamissjónsfólk, og tað sama er Ingolf. Kristna trúgvin á Gud hevur verið álit hansara øll hesi árini - og er tað enn.



»Heldarstindur« til fiskiskap í Eystursjónum:

**Fekk sinoppsgass frá 2. heimsbardaga í trolið**

*Eingin av manningini er í lívsvanda*

Hósdagin fekk sandavágstrolarin »Heldarstindur« sinoppsgass í trolið, meðan teir vóru til fiskiskap í Eystursjónum.
Manningin, ið telur 7 mans, er øll løgd inn á sjúkrahús í Danmark við brunasárum, men tilsetur er eingin teirra í lívsvanda, siga seinastu tíðindini úr Danmark.
Heldarstindur varð seinni togaður inn til Rønne, har teir vanliga løgdu veiðuna upp. Og í løtuni verður skipið reinsað fyri sinoppsgass.

**Frá seinna heimsbardaga**

Heldarstindur, sum fiskar við sovjetiskum loyvi í Eystursjónum, fekk sinoppsgassið í trolið uml. 60 sjómíl vestan fyri Lipaya í Russlandi.
Í fyrstu syftu vórðu bert tríggir av manningini sjúkir og lagdir inn á sjúkrahús á svenska oynni Gotland.
Men dagin eftir breiddu sjúkraeyðkennini seg til hinar fýra, og síðani varð avgjørt at flyta teir til Keypmannahavnar.
Og fríggjadagin vórðu fýra teirra fluttir á Ríkishospitalið til viðgerðar, meðan tríggir vórðu fluttir til brunasárdeildina á Hvidovre Hospital.
Sinoppsgassið stavar frá seinna heimsbardaga, og Søværnets Operative Kommando upplýsir, at fleiri útróðrarbátar hava fangað sinnoppsgass ístaðin fyri fisk hesar seinastu mánaðirnar.
Hetta er serliga farið fram í tí økinum, har teir Sameindu góvu týskarunum boð um at kasta út gassið eftir yvirgevingina í 1945.

Heldarstindur — øll manningin løgd inn á sjúkrahús við brunasárum

**Vandamikið**

Upplýst verður, at har eru ymisk sløg av gassi. Sinoppsgassið í trolinum hjá Heldarstindi inniheldur m.a. arcen, sum er eitt av teimum meiri vandamiklu gasssløgunum, veit Berlingske Tidende at siga.
Fólk hjá donsku sjóverjuni eru nú farin undir at reinsa skipið, umframt at allur fiskurin í lastini verður stoyttur fyri borð.
Við í reinsingini eru eisini tveir mans frá analytiska, kemiska laboratoriinum hjá Civilforsvaret, sum skulu kanna gassið.

www.vagaskip.dk

*Grein í føroyskari avís í sambandi við sinnopsgassið*



*Teir átta maskinmeistarar, sum fingu prógv hesa ferð, eru Bjartur Berg í Lágabø, Ellindur Ólavsson Lydersen, Andriast á Marknagili, Páll Ólavsson, Álvur Marnason Zachariasen, Ólavur Sjúrðarberg Petersen, Tóki Mørkøre og Bjartur Debes Isaksen*
***Virðislønir fyri bestu próvtøl:** Páll Ólavsson, grindaknív frá SEV; Tóki Mørkøre, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum; Andrias á Marknagili, kikara frá Norðoya Sparikassa*
***Ídnisvirðisløn:** Andrias á Marknagili, ur frá A. P. Møller*

# Átta maskinmeistarar fingu prógv

**Í síni røðu í sambandi við prógvhandanina á Vinnuháskúlanum minti formaðurin í Maskinmeistarafelagnum millum annað á tað harða fakfelagsarbeiðið, sum liggur aftan fyri øll framstig og vunnin rættindi. Hann heitti á nýklaktu maskinmeistararnar um altíð at hava fakfelagsandan og eitt samhaldsfast sinnalag við sær, sama hvaðar leiðin gekk**

Tekstur: Ingolf S. Olsen – PRESS
Myndir: Joan B. Poulsen, Vinnuháskúlin

Nógv fólk var komið saman til hugnaløtuna í Skálanum á Vinnuháskúlanum, tá prógvhandan var hósdagin 23. juni.

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum helt, sum siðvenja er, eina røðu, ið serliga vendi sær til nýggju maskinmeistararnar.

Ólavur Gunnarsson hugleiddi millum annað um, hvussu tað barst á, at hann sjálvur bleiv maskinmeistari – og ikki fylgdi barnadreyminum, sum var at blíva skipari. Tá hann kom til mans, var skiparadreymurin fánaður. Hann fór í smiðjulæru á Skála Skipasmiðju, og aftaná tað arbeiddi hann í 14 ár sum maskinmaður á Bakkafrosti, áðrenn hann fór undir útbúgvingina til maskinmeistara. So hann var rættiliga tilkomin samanborið við flest aðrar nýútbúnar maskinmeistarar, tá hann fekk sítt prógv í 2002.

Men tað hevur hann ongantíð angrað, vissaði hann um, og kundi síðan greiða


*Framhald á síðu 36*


VARÐIN
seafood from the Faroe Islands
LEIÐANDI REIÐARÍ
Í NORÐURHØVUM
VARÐIN | Garðabrekka 4 | +298 610680 | FO-510 Gøta | www.vardin.fo | vardin@vardin.fo

nýklaktu maskinmeistarunum frá tí ørgrynnu av starvsmøguleikum, ið bíðar teimum nú.

"Á hesi lívsleiðini havi eg arbeitt bæði á sjógvi og landi, og felagsnevnarin fyri øll størvini, eg havi havt, er, at tey hava verið hvørt betri og áhugaverdari enn annað.

Sæð í bakkspeglinum kann eg staðfesta, at tað valið, sum bleiv gjørt tá, avgjørt var tað rætta. Eg hevði ikki undir nøkrum umstøðum viljað býtt hesa lívsleiðina út við nakra sum helst aðra, tí at verða maskinmeistari er allarhelst besta starvið á jørðini.

Eitt, sum eisini er púra vist, tað er, at starvsmøguleikanir tróta ikki", segði Ólavur Gunnarsson millum annað.



*Kim Hansen sang og spældi sjálvur undir*

**Góð ráð**

Formaðurin legði nýggju meistarunum eina við at vera nærlagdir í sínum arbeiði, sama hvørja lívsleið teir ætlaðu sær, og hann minti teir á, at lærdómurin steðgar ikki, tó at maskinmeistaraprógvið er fingið til høldar.

"So um eg skal geva tykkum eini góð ráð, so eru tey, at tit royna at varðveita hugin at læra, og at tit, hóast kanska íborið framfýsni, geva tykkum stundir at dvølja við avbjóðingina, soleiðis at tit so hvørt verða ílatnir at takað næsta stigið uppeftir stiganum. Ansið eftir ongantíð at gerast ov hástórir og ov stórir í ondini til at taka ímóti og brúka vitanina hjá øðrum. Og verið hinvegin eisini altíð til reiðar at geva frá tykkum av tykkara egnu vitan. Verið ikki bangnir fyri at vísa format og at bjóða tykkum fram, men verið samstundis eisini til reiðar at loyva øðrum framat", segði Ólavur Gunnarsson.

Tann helst týdningarmesti parturin í røðuni hjá honum kom til seinast, nevniliga fakfelagsparturin.

"Sum fakfelagsformaður kann eg vissa tykkum um, at einki er komið av sær sjálvum, og aftan fyri øll tey framstig og rættindi, sum eru vunnin á leiðini, liggur eitt hart arbeiði og stríð, har nógv stór og tung tøk eru tikin.

Tí vil eg inniliga heita á tykkum, um altíð at hava tann partin við tykkum – at tit hava fakfelagsandan við sínum samhaldsfasta sinnalagi við tykkum, sama hvaðar leiðin gongur. Eisini tá ið tíðirnar eru góðar, og alt sær út til at koyra av sær sjálvum. Tí tað kann verða



*Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, minti nýklaktu maskinmeistararnar á altíð at hava fakfelagsandan við sínum samhaldsfasta sinnalagi við sær, sama hvaðar leiðin gekk*



*Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, var ímillum gestarøðararnar hesa ferð. Her situr hann saman við Símuni Poulsen, stjóra á Vinnuháskúlanum*

so skjótt, at okkurt stingur seg upp, sum er trupult at handfara einsamallur, og vandin er tá eisini, at ein kann koma at standa veikur og avbyrgdur og uttan máttin, sum krevst. Tá er tað gott at hava eitt bulvirki, eitt sterkt fakfelag, ímillum at taka stoytin, og sum kann syrgja fyri at fáa tingini á beint aftur – oftast til gagns fyri allar partar", segði Ólavur Gunnarsson.



*Nógv fólk var komið saman í Skálanum at heiðra nýklaktu maskinmeistararnar, skipararnar og skipsførararnar, nú korona ikki longur setur forðingar í vegin*

# Góð semja við FAG

**Í Maskinmeistarafelagnum fegnast tey um tvey ára sáttmálasemjuna fyri teir privatsettu maskinmeistararnar á landi. Umframt at fáa sama karm sum onnur feløg, eru seks nýggj stig komin á lønartalvuna**

Ingolf S. Olsen - PRESS

Umleið átta prosent yvir tvey ár var lønarúrslitið av sáttmálasamráðingunum ímillum Maskinmeistarafelagið og Føroya Arbeiðsgevarafelag, FAG – meira neyvt hækkar lønin 3,80 prosent 1. juni í ár og 4,04 prosent 1. juni næsta ár.

Talan er um sama lønarkarm sum tann, ið Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag samráddu seg til, men umframt hetta fekk Maskinmeistarafelagið ikki færri enn seks nýggj stig upp á lønartalvuna.

Í veruleikanum er talan um, at lønartalvan hjá maskinmeistarunum nú er víðkað til eisini at umfata tey seks lønarstigni, sum áður bert vóru ætlað maskinmeistarum í deildarleiðara- ella leiðarastarvi.



*17. juni skrivaðu Jórun Gardar, ráðgevi í Vinnuhúsinum, og Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, undir nýggja tvey ára semju ímillum Maskinmestarafelagið og Føroya Arbeiðsgevarafelag*

*Mynd: Maskinmeistarafelagið*

### Nøgdur formaður

Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, er nøgdur við úrslitið.

– Ein kundi altíð ynskt sær meira, enn ein fær, og tað plagar sanniliga at vera galdandi í sáttmálasamráðingum. Tað kundu vit sjálvandi eisini hesa ferð, men eg má bara staðfesta, at vit við



*Samráðingarnar við FAG gingu smidliga og í góðum anda. Her eru partarnir sessaðir til eitt samráðingarumfar 7. juni. Vinstrumegin borðið eru tað Ólavur J. Østerø, nevndarlimur í Maskinmeistarafelagnum, Sjúrður Heinesen, skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum, Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, og Tummas Eli Høj Joensen, nevndarlimur í Maskinmeistarafelagnum. Høgrumegin eru tað Birita Biskopstø, ráðgevi í Vinnuhúsinum, Jórun Gardar, ráðgevi í Vinnuhúsinum, og Høgni Hansen, næstformaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

hesari semjuni stórt sæð fingu tað, sum vit fóru eftir.

– Sáttmálin hevði bara 22 lønarstig, og til samanberingar hava almennir sáttmálar upp í eini 40 stig. Nú hevur okkara so 28, so tað bøtir um, sigur Ólavur Gunnarsson.

Í semjuni er eisini rættiliga vítt til veggja at gera av, nær og hvussu tey nýggju lønarstigini verða brúkt.

Broytingin er gjørd í § 2 um "Serstøk setanarviðurskifti", har stk. 1 hevur fingið eitt ískoyti (merkt við feitari skrift í endurgevingini niðanfyri), so tað nú er soljóðandi:

"Stk. 1. Leiðaraviðbót. Verður maskinmeistari settur í starv, sum til arbeiði, fyrisiting, dugleika ella annað hevur slíka serstøðu, at tær vanligu fyritreytir fyri niðanfyri nevndu lønir o.a.m. ikki hava gildi her, eiga partarnir sínámillum at gera seravtalur um viðbøtur at lønini og møguligar aðrar treytir. **Er talan um maskinmeistara ber til at seta hann inn á eitt av stigunum í lønartalvuni, sum er ætlað maskinmeistarum í deildarleiðara- ella leiðarastarvi. Maskinmeistari settur inn á lønarstig 23-28 hækkar ikki á lønarstiganum sambært starvsaldri.**"

– Við hesum ber til at fáa fleiri setanarviðurskifti at samsvara betri við nútíðina. Nógvir maskinmeistarar hava til dømis við tíðini flutt seg væl upp um minstulønina í sáttmálanum. Tað er eitt tvíeggjað svørð, tí tá er rúm fyri at verða settur niður í løn aftur. Nú er so ein møguleiki at innplasera teir í nýggju lønarstigini og tann vegin fáa lyft minstulønina, greiðir Ólavur Gunnarson frá.

## Aðrir batar

Aðrir smærri batar og tillagingar blivu eisini gjørdar í sáttmálanum við FAG. Eitt nú er latið upp fyri eginavtalum ímillum einstakar maskinmeistarar og arbeiðsgevara.

Hetta er gjørt í § 18, sum hevur fingið nýtt heiti, "Ser- og eginavtalur", og har eitt nýtt soljóðandi stk. 3 er skoytt uppí:

"Stk. 3. Til ber at gera eginavtalu millum arbeiðsgevara og einstaka maskinmeistaran. Treytin fyri slíkari eginavtalu er:

• At grundreglurnar eru tær somu sum í høvuðssáttmálanum.

• At avtalan, ið verður gjørd, samanlagt ikki er verri enn høvuðssáttmálin.

• At limagjaldið til Maskinmeistarafelagið til eina og hvørja tíð fylgir tí, sum er ásett í høvuðssáttmálanum.

• Um maskinmeistari ynskir at ráðføra seg við yrkisfelag sítt um avtaluna ella broytingar í henni, skal hann hava høvi til tess. Yrkisfelagið hevur tagnaðarskyldu um øll viðurskifti í avtaluni.

• Avtalan kann sigast upp av báðum pørtum við 3 mánaða freist."

Millum batarnar kann eisini nevnast broytingin í § 16, sum ásetir lønina, tá maskinmeistarar í avmarkaða tíð røkja hægri størv, enn teir eru settir til.

Áðrenn broytingina blivu hesir løntir samsvarandi tí hægru lønini, ið hoyrir til hægra starvið, um teir røktu tað í fimm dagar ella meira. Nú skulu teir bert røkja eitt slíkt starv í tríggjar dagar fyri at verða løntir við tí hægru lønini.

– Tey smái fetini skulu eisini virðismetast, og hetta er avgjørt eitt fet tann rætta vegin, sigur Ólavur Gunnarsson.

Øll semjan og dagførdi sáttmálin kann lesast inni á heimasíðuni hjá Maskinmeistarafelagnum, mf.fo.

# Sáttmálaleinging smakkaði illa

**Ólavur Gunnarsson heldur ikki, at tað ber til hjá feløgum at samráðast hvørt sær um felags sáttmálaásetingar. Tá Føroya Skipara- og Navigatørfelag ikki vildi krøkja yvirmannapartarnar burtur úr samráðingunum, fekk Maskinmeistarafelagið onki meira gjørt, sigur hann**



*Ólavur Gunnarsson heldur tað bara vera eitt eiti, tá manningarfeløgini samráðast hvørt sær: - Einasti sjónligi munurin er, at tey trý manningarfeløgini ikki kenna krøvini hjá hvørjum øðrum. Men tað ger Reiðarafelagið, og tí er tað í veruleikanum bara reiðararnir, sum hava fyrimunin*

Ingolf S. Olsen - PRESS

– Tað smakkaði okkum sera illa bara at leingja sáttmálan, men vit høvdu onki annað í at velja, tí Føroya Skipara- og Navigatørfelag vildi ikki lata spurningin um yvirmannapartarnar liggja, og so gav tað ikki meining hjá okkum at halda fram við samráðingunum.

Tað sigur Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, um sáttmálasamráðingarnar við Føroya Reiðarafelag.

Sáttmálin hjá teimum trimum manningarfeløgunum við reiðararnar gekk út 1. apríl, og hesa ferð bleiv samrátt hvør sær. Sáttmálakrøvini blivu handað í góðari tíð, og samráðingar vóru allan mars mánað.

## Longdur í eitt ár

Samráðingarnar gingu tó ongan veg, og 30. mars slitnaðu tær. Semingsstovnurin bleiv boðsendur, men heldur ikki semingsmenninir fingu glið á, og endin var, at Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag øðrumegin og Føroya Reiðarafelag hinumegin 23. apríl samdust um at leingja gamla sáttmálan í eitt ár til 1. apríl næsta ár. Føroya Fiskimannafelag royndi tó at samráðast víðari, men 27. mai gjørdi tað felagið eisini semju um at leingja sáttmálan til 1. apríl næsta ár.

Umframt leinging av gamla sáttmálanum fingu Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag eina nágreining av landingarútreiðslum og loyvdu frádráttirnar í tí sambandinum við í semjuna 23. apríl. Tað kom eisini við í semjuna hjá Føroya Fiskimannafelag. At hetta skuldi gerast, varð staðfest í einum ískoyti – protokollati – til sáttmálan í 2020, tá feløgini samráddust saman.

## Til reiðarans fyrimun

Ólavur Gunnarsson er alt annað enn fegin um úrslitið – ella rættari vantandi úrslitið – og heldur eina beinleiðis orsøk vera, at feløgini hesa ferð hvørt í sínum lagi skuldu samráðast við reiðararnar. Hann leggur nevniliga dent á, at hetta ikki hendi eftir ynski frá Maskinmeistarafelagnum.

– Nei, tað gjørdi tað ikki. Tað ljóðar kanska so freistandi at samráðast hvør sær fyri at fáa sum mest í sín part. Men orsøkin til, at vit oftast hava samráðst saman, er, at vit hava ein felags sáttmála. Gaman í eru ymiskar ásetingar fyri serlig viðurskifti hjá teimum ymisku feløgunum, men tað hevði elvt til mikið rok, um onkur fekk meira upp á eitt nú yvirmannapartar, um hetta ikki var avtalað innanhýsis ímillum feløgini frammanundan. Tað er mótparturin sjálvandi greiður yvir, og tí fer hann ikki at skapa sær sjálvum trupulleikar við tilvitað at forfordeila nakran í samráðingarmótpartinum, sigur Ólavur Gunnarsson.

Tí heldur hann tað eisini bara vera eitt eiti, tá samráðst verður hvør sær.

– Einasti sjónligi munurin er, at tey trý manningarfeløgini ikki kenna krøvini hjá hvørjum øðrum. Men tað ger Reiðarafelagið, og tí er tað í veruleikanum bara reiðararnir, sum hava fyrimunin, sigur Ólavur Gunnarsson.

Hann dylir ikki, at tað júst var spurningurin um yvirmannapartarnar, sum gjørdi enda á royndunum at røkka semju um nýggjan sáttmála hesa ferð.

- Vit vóru tó sinnaðir at krøkja tann spurningin burtur úr og síðan royna at fáa semju við Reiðarafelagið um onnur týðandi sáttmálaviðurskifti. Tað vóru reiðararnir eisini sinnaðir til, men Føroya Skipara- og Navigatørfelag segði nei. Tí endaðu vit í einari vónleysari støðu og kendu okkum noyddar at velja ta minst vandamiklu neyðloysnina, sum var at leingja gamla sáttmálan, sigur Ólavur Gunnarsson.

# Lønarhækkan gagnar báðum pørtum

**Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum óttast gongdina á almenna arbeiðsmarknaðinum, sum als ikki er kappingarførur, tá tað ræður um maskinmeistarafakið. Almennu arbeiðsgevararnir tykjast onki leggja í tað, heldur hann**

Ingolf S. Olsen - PRESS

Sum tað er greitt frá í aðrari grein her á síðunum, gekk tað skjótt og smidliga hjá Maskinmeistarafelagnum at fáa semju við Føroya Arbeiðsgevarafelag um nýggjan sáttmála fyri privat settar maskinmeistarar á landi. Men Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, óttast, at tað verður væl tyngri hoyggj at draga, tá teir almennu sáttmálarnir við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, KAF, eiga tørn – um arbeiðsgevarasíðan ikki fær eyguni upp fyri, at ein munandi lønarhækking gagnar báðum pørtum.

Teir almennu sáttmálarnir ganga út 1. oktober, eftir at Ólavur Gunnarsson er farin frá sum formaður, og annar hevur tikið við, men hann verður tó til taks hjá felagnum til tær samráðingarnar eisini.

– Sáttmálin fyri tann privata arbeiðsmarknaðin er ein minstalønsáttmáli, har tað er gaman í at rinda meira í løn, enn sáttmálin ásetir. Teir almennu eru harafturímóti absoluttir, og tí fært tú onki út um tað, sum stendur svart upp á hvítt í sjálvum sáttmálanum. Tað kann blíva ein stórur trupulleiki, um vit aftur bara blíva trýst inn í ein lønarkarm, sum onnur hava samrátt seg fram til, sigur hann.

### Óttast gongdina

Við fyrsta eygnabrá tykist tann støðan ikki vera nýggj, men Ólavur Gunnarsson leggur dent á, at trupulleikin er nógv meira álvarsamur, enn at ein bólkur av maskinmeistarum bara vil hava meira í løn í eini tíð við høgari inflasjón.

– Tann parturin er sjálvsagdur, men eg eri av álvara farin at óttast gongdina á almenna arbeiðsmarknaðinum – bæði tí kommunala og tí landsalmenna – tí tað verður alsamt torførari hjá stovnum og virkjum har at fáa fólk við góðum førleikum, og vit nærkast eini støðu, har samfelagsligar grundfunksjónir eru í vanda fyri at fara fyri bakka. Nú er tað púra vanligt, at ikki ein einasta umsókn kemur inn, tá almenn arbeiðspláss lýsa eftir maskinmeistarum, og leiðslur ringja til okkum at spyrja, hvat tey skulu gera, greiðir hann frá.

Orsøkin til støðuna er almenni lønarpolitikkurin, har tann fyrsta semjan í einum sáttmálaumfari ásetir karmin fyri allar aðrar sáttmálasamráðingar, heldur hann.

– Almennu arbeiðsgevararnir tvíhalda um henda ólukku karm, og tað ger, at tað er at kalla ómøguligt at taka atlit til serstøður. Mín fatan er, at teir annaðhvørt ikki skilja álvaran í gongdini ella onki leggja í tað, sigur Ólavur Gunnarsson.

Tann læsta støðan rundan um karmin er tó onkuntíð linkað eitt vet í samráðingum hjá øðrum feløgum, men júst tað hevur ikki bøtt um støðuna hjá Maskinmeistarafelagnum – heldur tvørturímóti, heldur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum.

– Alt tað politiska og fólksliga trýstið á arbeiðsgevararnar um at víkja frá karminum snýr seg um tey lægst løntu og umsorganarstørvini, tí tað talar beint til ta sosialu samvitskuna. Og alt gott um, at hesi starvsøkini verða lyft, tí ongin skal ivast í, at vit unna teimum hvørja krónu. Men tá hesir bólkar verða gjørdir til einasta undantakið frá regluni, er onki rúm eftir at fáa loyst átrokandi trupulleikar út um karmin á til dømis okkara øki, sigur Ólavur Gunnarsson.

### Lívsleiðin arbeiddi ímóti

Hann hevur áður víst á, at lívsleiðin hjá føroyskum maskinmeistarum partvíst sjálv er orsøk til, at lønirnar í almenna geiranum eru, sum tær eru. Tí tað vanliga mynstrið hevur verið, at nógvir maskinmeistarar sigla úti ella arbeiða í frálandavinnu á yngri árum. Tá leggja teir nógv fyri, eru nógv burtur, tjena ofta væl av pengum, og tey stóru fíggjarligu tøkini verða tikin tá. Sum teir eldast, veksur hugurin so til at verða meira heima, og tað vigar ofta meira enn møguleikin fyri at varðveita eitt høgt lønarstig.

– Tú kanst siga, at tað í Føroyum hevur verið lutfalsliga lætt at fáa góðar maskinmeistarar við nógvum og góðum royndum at arbeiða fyri eina løn, sum er minni enn aðrastaðni. Tí teir hava raðfest onnur ting hægri. Lønartrýstið hevur tí verið minni, og tað hava



*– Ongin tímir longur at arbeiða fyri lønir, sum ikki eru kappingarførar, og tað verða eisini støðugt fleiri spennandi og betri lønt maskinmeistarastørv í privatu vinnuni í Føroyum at fara til, um tú ert troyttur av at sigla ella arbeiða uttanlands, sigur Ólavur Gunnarsson um sáttmálastøðuna á almenna arbeiðsmarknaðinum*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

arbeiðsgevararnir kunnað gjørt sær dælt av.

– Men tað mynstrið er broytt, ongin tímir longur at arbeiða fyri lønir, sum ikki eru kappingarførar, og tað verða eisini støðugt fleiri spennandi og betri lønt maskinmeistarastørv í privatu vinnuni í Føroyum at fara til, um tú ert troyttur av at sigla ella arbeiða uttanlands, sigur Ólavur Gunnarsson.

## Eitt felags mál

Hann leggur dent á, at almennu arbeiðsgevararnir verða noyddir at hugsa um heildina og framtíðarstøðuna í øllum geiranum, tá teir setast við samráðingarborðið í heyst.

– Vit hava í áravís endurtikið upp í saman, men fyri deyvum oyrum, at vit lønarliga eru eftirbátar, tá vit samanbera við almennu maskinmeistaralønirnar í londunum rundan um okkum. Tá hava vit sum felag í fyrsta lagi hugsað um lønarstøðuna hjá okkara limum, sum er okkara fremsta skylda. Men eg haldi veruliga, at tað eisini er okkara skylda at rópa varskó, tá samfelagsligar grundfunksjónir eru í vanda fyri at fara fyr bakka, sum tær eru nú.

– Tað er hetta, vit fegin vilja fokusera upp á og saman við arbeiðsgevarunum gera tey almennu størvini nóg lokkandi til, at tey kunnu mannast. Tað snýr seg um at framtíðartryggja eitt alment virksemi, og tað eigur í minst líka stóran mun at vera eitt mál og ein skylda hjá arbeiðsgevarunum sum hjá okkum, sigur Ólavur Gunnarsson.

## Fyrimunir og vansar

Hann heldur, at tað gamla mynstrið við, at føroyskir maskinmeistarar eins og fleiri aðrir fakbólkar ein stóran part at teirra arbeiðslívi hava leitað sær á fremmandan kjøl ella út í heim at arbeiða, avgjørt hevur havt sínar fyrimunir. Men tað hevur eisini havt nakrar óhepnar avleiðingar – eisini aðrar enn bara tær, vit nú síggja í tí almenna geiranum.

– Tørvurin var heilt ein annar fyrr, so tá riggaði hatta fínt. Men tørvurin á maskinmeistarum gerst alsamt størri her heima, og fyri at hava ein góðan dynamikk á øllum arbeiðsmarknaðinum, er tað nógv best, at tú eisini hevur eitt javnt útboð av væl kvalifiseraðari arbeiðsmegi. Vit hava altíð havt eitt stórt undirskot av yngri maskinmeistarum, sum bjóða seg fram á tí føroyska arbeiðsmarknaðinum. Tað er óheppið, ikki minst tá vit hugsa um útlitini fyri at menna og granska. Men tað gongur báðar vegir, og skulu vit draga maskinmeistarar í øllum aldri at okkum, so krevst eisini, at arbeiðsmøguleikarnir eru spennandi og lokkandi, bæði tá tað ræður um løn og um menningarmøguleikar, sigur Ólavur Gunnarsson.

# TÍÐINDI frá Maskinmeistarafelagnum

**4. februar 2022**
Nevndarfundur á skrivstovu felagsins. Á skrá vóru 5 mál til støðutakan umframt kunning um 14 onnur viðurskifti.

**11. febfebruar 2022**
Fundur við umboð fyri hini manningarfeløgini um komandi sáttmálasamráðingar við Føroya Reiðarafelag.

**18. februar 2022**
Fundur við Føroya Reiðarafelag um komandi sáttmálasamráðingar og útistandandi protokollat frá seinastu samráðingum.

**18. februar 2022**
Fundur millum Trygdargrunnin og landsstýrismannin í Fiskivinnumálum.

**25. februar 2022**
Fundur við FSN har ymisk viðurskiftir í sáttmálanum við Føroya Reiðarafelag vóru havd á lofti.

**2. mars 2022**
Fundur við Reiðaríið fyri Handilsskip. Fundurin var í Vinnuhúsinum.

**3. mars 2022**
Nevndarfundur á skrivstovuni, sum í høvuðsheitinum snúði seg um komandi sáttmálasamráðingar við Føroya Reiðarafelag.

**3. mars 2022**
Handan av sáttmálakrøvum til sáttmálan millum Maskinmeistarafelag og Føroya Reiðarafelag. Handanin fór fram í Vinnuhúsinum.

**4. mars 2022**
Fundur við formenninar í hinum manningarfeløgunum um ymisk viðurskifti bæði í fiski- og handilsflotanum.

**10. mars 2022**
Samráðingarfundur millum Maskin-meistafelagið og Føroya Reiðarafelag.

**16. mars 2022**
Samráðingarfundur millum Maskin-meistafelagið og Føroya Reiðarafelag.

**17. mars 2022**
Nevndarfundur í P/F Fakfelag. Fundurin varð hildin í hølunum hjá Samverk.

**19. mars 2022**
Aðalfundur felagsins. Aðalfundurin varð hildin á Hotel Hafnia.

**22. mars 2022**
Felagsfundur millum manningarfeløgini við tí fyri eyga- at fáa samanskrivað sáttmálakrøv.

**22. mars 2022**
Nevndarfundur í Fasta Gerðarrættinum. Fundurin var hildin í hølunum hjá ALS.

**23. mars 2022**
Samráðingarfundur millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag.

**24. mars 2022**
Samráðingarfundur millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag.

**25. mars 2022**
Fundur við Sókn-advokatar um mál, sum er lagt fyri Fasta Gerðarrættin.

**25. mars 2022**
Nevndarfundur á skrivstovu felagsins. Til umrøðu vóru 4 mál til støðutakan umframt kunning um 8 onnur viðurskifti.

**29. mars 2022**
Fundur at umrøða sáttmálasamráðingarnar við Føroya Reiðarafelag.

**29. mars 2022**
Samráðingarfundur millum Maskin-meistafelagið og Føroya Reiðarafelag.

**30. mars 2022**
Samráðingarfundur millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag. Endin av fundinum var at semingsstovnurin varð boðsendur.

**5. apríl 2022**
Fundur við umboð fyri JFK á skrivstovu felagsins. Til umrøðu vóru viðurskifti um útgjald av inntøkutapstrygging til manningar.

**6. apríl 2022**
Nevndarfundur á skrivstovu felagsins. Til umrøðu vóru 3 mál til støðutakan umframt kunning um 6 onnur viðurskifti.

**7. apríl 2022**
Semingsroynd millum yvirmannafeløgini og Føroya Reiðarafelag.

**8. apríl 2022**
Semingsroynd millum yvirmannafeløgini og Føroya Reiðarafelag.

**9. apríl 2022**
Semingsroynd millum yvirmannafeløgini og Føroya Reiðarafelag.

**13. apríl 2022**
Fundur millum formenninar í yvirmannafeløgunum við tí fyri eyga, at fáa glið á semingsroyndina aftur.

**13. apríl 2022**
Nevndarfundur á skrivstovu felagsins. Á skrá var kunning um 4 ymisk viðurskifti.

**22. apríl 2022**
Fundur við LÍV um samlagstryggingina.

**22. apríl 2022**
Semingsroynd í Vinnuhúsinum

**23. apríl 2022**
Semingsroynd í Vinnuhúsinum. Endin var, at semja var um at leingja sáttmálan millum yvirmannafeløgini og Føroya Reiðarafelag við einum árið.

**29. apríl 2022**
Nevndarfundur á skrivstovu felagsins. Til umrøðu vóru 3 mál til støðutakan umframt kunning um 3 onnur viðurskiftir.

**2. mai 2022**
NMF fundur í Helsinki.

**3. mai 2022**
NMF fundur í Helsinki.

**5. mai 2022**
Stýrisfundur í Trygdargrunninum.

**6. mai 2022**
Fundur við lim undir grønlendska GE sáttmálanum. 09. Blaðfundur á skrivstovuni.




| **Navn** | **Føðingardagur** | **Bygd/býur** | **Aldur** |
|---|---|---|---|
| Jørgen Poulsen | 5/5-1952 | Hoyvík | 70 ár |
| Símun Dahl | 18/5-1952 | Klaksvík | 70 ár |
| Eyðun Jespersen | 15/7-1952 | Tórshavn | 70 ár |
| Torkil Strøm | 7/5-1962 | Vágur | 60 ár |
| Jack Toftegaard | 19/5-1962 | Fuglafjørður | 60 ár |
| Pauli Gunnl. Høgnesen | 10/7-1962 | Vestmanna | 60 ár |
| Allan Poulsen | 30/7-1962 | Saltangará | 60 ár |
| Heðin Mortensen | 31/7-1962 | Hoyvík | 60 ár |
| Høgni Hammerfoss | 18/5-1972 | Froðba | 50 ár |
| Leif Klein | 11/6-1972 | Tórshavn | 50 ár |
| Helgi Eysturberg | 20/5-1982 | Tvøroyri | 40 ár |
| Angus Winth. Olsen | 22/5-1982 | Hoyvík | 40 ár |
| Jákup Martin á Válinum | 9/6-1982 | Vestmanna | 40 ár |
| Fróði Festirst. Nielsen | 9/6-1982 | Eiði | 40 ár |
| Súni Kvilt Sigurðsson | 11/6-1982 | Saltangará | 40 ár |
| Erhard Olaf Nybo | 19/6-1982 | Tórshavn | 40 ár |
| Sigmundur Nolsø | 24/7-1992 | Hoyvík | 30 ár |



**Nýggjur orkuportalur hjá SEV**

# Fylg við

**Við orkuportalinum Mítt SEV fært tú neyvt fylgt við elnýtsluni. Eisini fært tú skjótt og greitt yvirlit yvir fíggjarstøðuna v.m.**

## Fylg við nýtsluni

Á nýggja orkuportalinum sært tú, hvussu nógv tit hava brúkt seinasta samdøgrið, vikuna, mánaðin ella árið.

## Samanber tíðarskeið

Brúka tit meira ella minni enn í fjør? Við orkuportalinum ber til at samanbera tíðarskeið. T.d. nýtsluna í mun til sama tíðarskeið árið fyri.

## Hvussu grøn eru tit?

Til ber eisini at síggja, hvussu stórur partur av orkunýtsluni er grøn orka. Jú grønari, jú betri.

## Yvirlit yvir fleiri eindir

Hava tit fleiri málarar, ber til at fáa greitt yvirlit yvir hvørja eind sær, bólka málararnar og geva teimum nøvn. Til ber at snikka sítt egna yvirlit eftir tørvi.

## Ávaring um høga nýtslu

Skipanin hevur boðtænastu, sum sendir tær kunning um nýtslan fer upp um ella niður um ásett mark.

SANSIR

**Á sev.fo sært tú, hvussu tú ritar inn.**

SEV